| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>31. oktober 2013 | Blað nr.:<br>**10774** |
|---|---|
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **31. oktober 2013** **kl. 16.15**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 180/13-211/13**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Jógvan Arge
Elin Lindenskov
Helena Dam á Neystabø
Sigrún Mohr
Tróndur Sigurdsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Sjúrður Olsen
Jákup Dam
Marin Katrina Frýdal
Bjørghild Djurhuus

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Ingunn Eikriksdóttir

**LUTTÓKU EISINI:**
Jákup E. Hansen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

**188/13** **<u>2013-0175</u>**

**<u>Mál beind í nevndir</u>**

**Býráðið 31. oktober 2013:** Tikið til eftirtektar.

**189/13** **<u>2013-0143</u>**

**<u>Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2013</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2013 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. februar 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 21. februar 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2013 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 21. mars 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

Roknskapurin fyri mars 2013 verður lagdur fram.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri apríl 2013 verður lagdur fram.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 30. mai 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

Roknskapurin fyri mai 2013 verður lagdur fram.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 26. juni 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

Roknskapurin fyri juni og juli 2013 verður lagdur fram.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 16. september 2013:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri august og september 2013 verður lagdur fram.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

**190/13** **2013-1526**

**Fíggjarætlan 2014**

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Uppskot til fíggjarætlan 2014 á greinastøði varð lagt fram. Samtykt at arbeiða víðari við uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2014 við teirri broyting, at eingin vøkstur verður í rakstrarútreiðslunum.

Jógvan Arge luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Ískoyti:**
Stjórnin hevur arbeitt víðari við uppskotinum til fíggjarætlan 2014.

Uppskotið verður lagt fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 23. september 2013:** Framlagt og samtykt at leggja fyri býráðið.

**Býráðið 26. september 2013:** Framlagt.

# Yvirlit

## Høvuðsyvirlit

**Høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlan** **2014**

| Túsund kr. | | Rakstrarætlan Útreiðslur | Rakstrarætlan Inntøkur | Løgu-ætlan |
|---|---|---|---|---|
| **§ 1.** | **Kommunal fyrisiting** | **69.721** | **-** | **-** |
| | 11 Felagsútreiðslur | 66.658 | - | - |
| | 18 Almenn starvsfólk v.m. | 3.063 | - | - |
| **§ 2.** | **Almanna- og heilsumál** | **54.127** | **-** | **1.000** |
| | 20 Heilsumál | 16.005 | - | - |
| | 21 Almannamál | 38.122 | - | 1.000 |
| **§ 3.** | **Børn og ung** | **134.902** | **-** | **5.000** |
| | 24 Mentan | 6.844 | - | - |
| | 26 Barnaansing | 128.058 | - | 5.000 |
| **§ 4.** | **Undirvísing** | **36.701** | **-** | **-** |
| | 23 Útbúgving og gransking | 36.701 | - | - |
| **§ 5.** | **Mentan og frítíð** | **41.325** | **-** | **43.000** |
| | 23 Útbúgving og gransking | 10.532 | - | 3.000 |
| | 24 Mentan | 30.793 | - | 40.000 |
| **§ 6.** | **Teknisk mál** | **110.487** | **-** | **42.000** |
| | 11 Felagsútreiðslur | 49.310 | - | 25.000 |
| | 22 Íbúðarmál | - | - | 2.000 |
| | 24 Mentan | 2.798 | - | 1.000 |
| | 30 Umhvørvi | 17.913 | - | 4.000 |
| | 38 Samferðsla og samskifti | 40.466 | - | 10.000 |
| **§ 7.** | **Kommunal virki** | **32.820** | **-** | **40.598** |
| | 30 Umhvørvi | 18.497 | - | 19.000 |
| | 31 Tilbúgving | 8.171 | - | - |
| | 37 Handil og vinna annars | 3.720 | - | - |
| | 38 Samferðsla og samskifti | 2.432 | - | 21.598 |
| **Tilsamans** | | **480.083** | **-** | **131.598** |
| § 20. | 22 Íbúðarmál | 25.000 | - | - |
| § 20. | 50 Rentur | 10.332 | 300 | - |

| | | | |
|---|---|---|---|
| . | | | |
| § 20. 52 Skattir og avgjøld | 2.250 | 648.963 | - |
| . | | | |
| Tilsamans | 517.665 | 649.263 | 131.598 |
| **Yvirskot** | **-** | **131.598** | **-** |

| | Útreiðslur | Inntøkur | Yvirskot |
|---|---|---|---|
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ** | **-** | **0** | **-** |
| § 25. 62 Afturgjald av skuld | 17.739 | - | **-** |
| . | | | |
| **Bruttokassaúrslit** | **17.739** | **0** | **-17.739** |
| Fígging: | | | |
| § 25. 64 Útvegan av gjaldføri | - | 17.739 | **-** |
| . | | | |
| Fígging íalt: | - | 17.739 | 17.739 |
| **Samanlagt** | **17.739** | **17.739** | **-** |

# Tekstur

## § 1 Kommunal fyrisiting

### A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 69.721 | 69.721 | - |
| **Felagsútreiðslur** | | **66.658** | **-** |
| 1.11.11. Samsýningar o.a. til kommunustýrislimir | | 3.488 | - |
| 1.11.12. Val og valnevndir | | 50 | - |
| 1.11.14. Kommunufyrisitingin | | 61.929 | - |
| 1.11.21. Kommunufeløg | | 1.191 | - |
| **Almenn starvsfólk v.m.** | | **3.063** | **-** |
| 1.18.11. Tænastumannaeftirlønir | | 3.063 | - |
| *Yvirlit yvir høvuðssløg:* | | | |
| Játtan tilsamans | | 69.721 | - |
| Nettostýrt virksemi | | 4.311 | 4.311 |
| Virksemi tilsamans | | 74.032 | 4.311 |
| Rakstrarinntøkur | | - | 2.211 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | | 751 | 2.000 |
| Flytingarútreiðslur | | 4.238 | - |
| Rakstrarútreiðslur | | 69.043 | - |
| Skattir og flytingarinntøkur | | - | 100 |

### B. Játtanir

| Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|
| - Tús. kr. - | |

## Felagsútreiðslur

| | | | |
|---|---|---|---|
| **1.11.11.** | **Samsýningar o.a. til kommunustýrislimir** | | |
| 110. | Samsýningar o.a. til kommunustýrislimir (Rakstrarj.) | 3.488 | - |
| **1.11.12.** | **Val og valnevndir** | | |
| 110. | Val og valnevndir (Rakstrarj.) | 50 | - |
| **1.11.14.** | **Kommunufyrisitingin** | | |
| 110. | Kommunufyrisitingin (Rakstrarj.) | 61.929 | - |
| **1.11.21.** | **Kommunufeløg** | | |
| 110. | Kommunufeløg (Stuðulsj.) | 1.191 | - |

## Almenn starvsfólk v.m.

| | | | |
|---|---|---|---|
| **1.18.11.** | **Tænastumannaeftirlønir** | | |
| 110. | Eftirlønir (Stuðulsj.) | 3.063 | - |

# § 2 Almanna- og heilsumál

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 54.127 | 54.127 | - |
| Løguætlan | 1.000 | 1.000 | - |
| **Heilsumál** | | **16.005** | **-** |
| 2.20.21. Ymiskar heilsuútreiðslur | | 1.700 | - |
| 2.20.22. Kommunulækna- og heilsutænastur | | 4.000 | - |
| 2.20.23. Tannrøkt | | 10.305 | - |
| **Almannamál** | | **39.122** | **-** |
| 2.21.12. Stuðul til endamál innan almanna- og heilsumál | | 100 | - |
| 2.21.13. Ymiskar almannaútreiðslur | | 1.204 | - |
| 2.21.31. Barnavernd | | 26.284 | - |
| 2.21.61. Eldrarøkt | | 3.313 | - |
| 2.21.62. Tilboð og tiltøk til eldri | | 3.221 | - |
| 2.21.72. Forsorg | | 5.000 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 55.127 | - |
| Nettostýrt virksemi | 76.857 | 76.857 |
| Virksemi tilsamans | 131.984 | 76.857 |
| Rakstrarinntøkur | - | 1.438 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 6.344 | 75.419 |
| Flytingarútreiðslur | 6.684 | - |
| Rakstrarútreiðslur | 117.956 | - |
| Løguútreiðslur | 1.000 | - |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |

### Heilsumál

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| **2.20.21.** | **Ymiskar heilsuútreiðslur** | | |
| 110. | Ymiskar heilsuútreiðslur (Rakstrarj.) | 1.700 | - |
| **2.20.22.** | **Kommunulækna- og heilsutænastur** | | |
| 110. | Kommunulækna- og heilsutænastur (Rakstrarj.) | 4.000 | - |
| **2.20.23.** | **Tannrøkt** | | |
| 110. | Tannrøkt (Rakstrarj.) | 10.305 | - |

### Almannamál

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| **2.21.12.** | **Stuðul til endamál innan almanna- og heilsumál** | | |
| 110. | Stuðul til endamál innan almanna- og heilsumál (Stuðulsj.) | 100 | - |
| **2.21.13.** | **Ymiskar almannaútreiðslur** | | |
| 110. | Ymiskar almannaútreiðslur (Rakstrarj.) | 1.204 | - |
| **2.21.31.** | **Barnavernd** | | |
| 110. | Barnavernd (Rakstrarj.) | 26.284 | - |
| **2.21.61.** | **Eldrarøkt** | | |
| 111. | Eldrarøkt (Løguj.) | 1.000 | - |
| 110. | Eldrarøkt (Rakstrarj.) | 2.313 | - |
| **2.21.62.** | **Tilboð og tiltøk til eldri** | | |
| 110. | Tilboð og tiltøk til eldri (Rakstrarj.) | 3.221 | - |
| **2.21.72.** | **Forsorg** | | |
| 110. | Forsorg (Stuðulsj.) | 5.000 | - |

# § 3 Børn og ung

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 134.902 | 134.902 | - |
| Løguætlan | 5.000 | 5.000 | - |
| **Mentan** | | **6.844** | **-** |
| 3.24.12. Tilboð og tiltøk til børn og ungdóm | | 6.844 | - |
| **Barnaansing** | | **133.058** | **-** |
| 3.26.11. Barnaansing | | 133.058 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 139.902 | - |
| Nettostýrt virksemi | 34.251 | 34.251 |
| Virksemi tilsamans | 174.153 | 34.251 |

| | | |
|---|---|---|
| Rakstrarinntøkur | - | 34.251 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 9.262 | - |
| Flytingarútreiðslur | 12.112 | - |
| Rakstrarútreiðslur | 147.779 | - |
| Løguútreiðslur | 5.000 | - |

## B. Játtanir

Útreiðslur Inntøkur
- Tús. kr. -

### Mentan

| | | | |
|---|---|---|---|
| **3.24.12.** | **Tilboð og tiltøk til børn og ungdóm** | | |
| 110. | Tilboð og tiltøk til børn og ung (Rakstrarj.) | 6.844 | - |

### Barnaansing

| | | | |
|---|---|---|---|
| **3.26.11.** | **Barnaansing** | | |
| 110. | Barnaansing (Rakstrarj.) | 111.187 | - |
| 111. | Barnaansing (Løguj.) | 5.000 | - |
| 112. | Aðrar útreiðslur í samband við barnaansing (Rakstrarj.) | 16.871 | - |

# § 4 Undirvísing

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 36.701 | 36.701 | - |
| **Útbúgving og gransking** | | **36.701** | **-** |
| 4.23.22. Fólkaskúlin | | 35.776 | - |
| 4.23.31. Endurgjald til lærlingaútreiðslur | | 925 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 36.701 | - |
| Nettostýrt virksemi | - | - |
| Virksemi tilsamans | 36.701 | - |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 3.927 | - |
| Flytingarútreiðslur | 1.020 | - |
| Rakstrarútreiðslur | 31.754 | - |

## B. Játtanir

Útreiðslur Inntøkur
- Tús. kr. -

### Útbúgving og gransking

**4.23.22. Fólkaskúlin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 112. | Verkætlanir og aðrar útreiðslur á fólkaskúlaøkinum (Rakstrarj.) | 1.962 | - |
| 110. | Fólkaskúlin (Rakstrarj.) | 33.814 | - |
| **4.23.31.** | **Endurgjald til lærlingaútreiðslur** | | |
| 110. | Endurgjald til lærlingaútreiðslur (Stuðulsj.) | 925 | - |

# § 5 Mentan og frítíð

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 41.325 | 41.325 | - |
| Løguætlan | 43.000 | 43.000 | - |
| **Útbúgving og gransking** | | **13.532** | **-** |
| 5.23.51. Musikkskúlin | | 9.631 | - |
| 5.23.52. Kvøld- og listaskúlar | | 3.901 | - |
| **Mentan** | | **70.793** | **-** |
| 5.24.13. Tilboð og tiltøk innan mentan og frítið | | 4.935 | - |
| 5.24.14. Stuðul til ítróttar- og mentanarendamál | | 6.166 | - |
| 5.24.31. Bókasavn | | 6.116 | - |
| 5.24.32. Søvn og mentanararvur | | 755 | - |
| 5.24.61. Svimjihøllin | | 6.627 | - |
| 5.24.62. Ítróttaranlegg | | 46.194 | - |
| *Yvirlit yvir høvuðssløg:* | | | |
| Játtan tilsamans | | 84.325 | - |
| Nettostýrt virksemi | | 12.491 | 12.491 |
| Virksemi tilsamans | | 96.816 | 12.491 |
| Rakstrarinntøkur | | - | 8.821 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | | 5.313 | 3.590 |
| Flytingarútreiðslur | | 6.166 | - |
| Rakstrarútreiðslur | | 42.337 | - |
| Skattir og flytingarinntøkur | | - | 80 |
| Løguútreiðslur | | 43.000 | - |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |

### Útbúgving og gransking

| | | | |
|---|---|---|---|
| **5.23.51.** | **Musikkskúlin** | | |
| 110. | Musikkskúlin (Rakstrarj.) | 6.631 | - |
| 111. | Musikkskúlin (Løguj.) | 3.000 | - |
| **5.23.52.** | **Kvøld- og listaskúlar** | | |
| 110. | Kvøld- og listaskúlar (Rakstrarj.) | 3.901 | - |

## Mentan

| | | | |
|---|---|---|---|
| **5.24.13.** | **Tilboð og tiltøk innan mentan og frítið** | | |
| 111. | Tilboð og tiltøk innan mentan og frítíð (Løguj.) | 2.000 | - |
| 110. | Tilboð og tiltøk innan mentan og frítíð (Rakstrarj.) | 2.935 | - |
| **5.24.14.** | **Stuðul til ítróttar- og mentanarendamál** | | |
| 111. | Stuðul til íløgur (Stuðulsj.) | 506 | - |
| 110. | Stuðul til ítróttar- og mentanarendamál (Stuðulsj.) | 5.660 | - |
| **5.24.31.** | **Bókasavn** | | |
| 110. | Bókasavn (Rakstrarj.) | 6.116 | - |
| **5.24.32.** | **Søvn og mentanararvur** | | |
| 110. | Søvn og mentanararvur (Rakstrarj.) | 755 | - |
| **5.24.61.** | **Svimjihøllin** | | |
| 110. | Svimjihøllin (Rakstrarj.) | 6.627 | - |
| **5.24.62.** | **Ítróttaranlegg** | | |
| 110. | Ítróttaranlegg (Rakstrarj.) | 8.194 | - |
| 111. | Ítróttaranlegg (Løguj.) | 38.000 | - |

# § 6 Teknisk mál

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 110.487 | 110.487 | - |
| Løguætlan | 42.000 | 42.000 | - |
| **Felagsútreiðslur** | | **74.310** | **-** |
| 6.11.31. Umsiting og røkt av fastognum | | 49.362 | - |
| 6.11.32. Fríðkan av kommununi | | 24.948 | - |
| **Íbúðarmál** | | **2.000** | **-** |
| 6.22.11. Byggibúning bústaðir | | 2.000 | - |
| **Mentan** | | **3.798** | **-** |
| 6.24.51. Kirkjugarður | | 3.798 | - |
| **Umhvørvi** | | **21.913** | **-** |
| 6.30.11. Umhvørvistiltøk v.m. | | 2.278 | - |
| 6.30.21. Vatnveiting | | 6.398 | - |
| 6.30.41. Kloakkir | | 13.237 | - |
| **Samferðsla og samskifti** | | **50.466** | **-** |
| 6.38.11. Vegir | | 34.594 | - |
| 6.38.12. Gøtuljós | | 7.334 | - |
| 6.38.13. Rakstrargøgn | | 8.538 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 152.487 | - |
| Nettostýrt virksemi | 15.756 | 15.756 |
| Virksemi tilsamans | 168.243 | 15.756 |

| | | |
|---|---|---|
| Rakstrarinntøkur | - | 15.756 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 4.396 | - |
| Flytingarútreiðslur | 600 | - |
| Rakstrarútreiðslur | 121.247 | - |
| Løguútreiðslur | 42.000 | - |

# B. Játtanir

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| | - Tús. kr. - | |

## Felagsútreiðslur

| | | |
|---|---|---|
| **6.11.31. Umsiting og røkt av fastognum** | | |
| 110. Umsiting og røkt av fastognum (Rakstrarj.) | 39.362 | - |
| 111. Umsiting og røkt av fastognum (Løguj.) | 10.000 | - |
| **6.11.32. Fríðkan av kommununi** | | |
| 111. Fríðkan av kommununi (Løguj.) | 15.000 | - |
| 110. Fríðkan av kommununi (Rakstrarj.) | 9.948 | - |

## Íbúðarmál

| | | |
|---|---|---|
| **6.22.11. Byggibúning bústaðir** | | |
| 111. Byggibúning bústaðir (Løguj.) | 2.000 | - |

## Mentan

| | | |
|---|---|---|
| **6.24.51. Kirkjugarður** | | |
| 111. Kirkjugarðar (Løguj.) | 1.000 | - |
| 110. Kirkjugarðar (Rakstrarj.) | 2.798 | - |

## Umhvørvi

| | | |
|---|---|---|
| **6.30.11. Umhvørvistiltøk v.m.** | | |
| 110. Umhvørvistiltøk v.m. (Rakstrarj.) | 2.278 | - |
| **6.30.21. Vatnveiting** | | |
| 110. Vatnveiting (Rakstrarj.) | 6.398 | - |
| **6.30.41. Kloakkir** | | |
| 111. Kloakkir (Løguj.) | 4.000 | - |
| 110. Kloakkir (Rakstrarj.) | 9.237 | - |

## Samferðsla og samskifti

| | | |
|---|---|---|
| **6.38.11. Vegir** | | |
| 110. Vegir (Rakstrarj.) | 28.594 | - |
| 111. Vegir (Løguj.) | 6.000 | - |
| **6.38.12. Gøtuljós** | | |
| 110. Gøtuljós (Rakstrarj.) | 7.334 | - |
| **6.38.13. Rakstrargøgn** | | |
| 110. Rakstrargøgn (Rakstrarj.) | 4.538 | - |
| 111. Rakstrargøgn (Løguj.) | 4.000 | - |

# § 7 Kommunal virki

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 32.820 | 32.820 | - |
| Løguætlan | 40.598 | 40.598 | - |
| **Umhvørvi** | | **37.497** | **-** |
| 7.30.42. Renovasjón | | 37.497 | - |
| **Tilbúgving** | | **8.171** | **-** |
| 7.31.11. Sløkkiliðið | | 8.171 | - |
| **Handil og vinna annars** | | **3.720** | **-** |
| 7.37.51. Vinnumenning | | 3.720 | - |
| **Samferðsla og samskifti** | | **24.030** | **-** |
| 7.38.14. Havnir og lendingar | | 0 | - |
| 7.38.21. Bussleiðin | | 24.030 | - |
| 7.38.22. Parkeringsskipanin | | 0 | - |
| *Yvirlit yvir høvuðssløg:* | | | |
| Játtan tilsamans | | 73.418 | - |
| Nettostýrt virksemi | | 77.752 | 77.752 |
| Virksemi tilsamans | | 151.170 | 77.752 |
| Rakstrarinntøkur | | - | 70.565 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | | 3.015 | 5.000 |
| Flytingarútreiðslur | | 5.900 | - |
| Rakstrarútreiðslur | | 101.657 | - |
| Skattir og flytingarinntøkur | | - | 2.187 |
| Løguútreiðslur | | 40.598 | - |

## B. Játtanir

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| | - Tús. kr. - | |

### Umhvørvi

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| **7.30.42. Renovasjón** | | |
| 110. Renovasjón (Rakstrarj.) | 18.497 | - |
| 111. Renovasjón (Løguj.) | 19.000 | - |

### Tilbúgving

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| **7.31.11. Sløkkiliðið** | | |
| 110. Sløkkiliðið (Rakstrarj.) | 8.171 | - |

### Handil og vinna annars

| | | | |
|---|---|---|---|
| **7.37.51.** | **Vinnumenning** | | |
| 110. | Vinnumenning (Rakstrarj.) | 3.720 | - |

## Samferðsla og samskifti

| | | | |
|---|---|---|---|
| **7.38.14.** | **Havnir og lendingar** | | |
| 111. | Havnir og lendingar (Løguj.) | 21.598 | - |
| 110. | Havnir og lendingar (Rakstrarj.) | -21.598 | - |
| **7.38.21.** | **Bussleiðin** | | |
| 110. | Bussleiðin (Rakstrarj.) | 24.030 | - |
| **7.38.22.** | **Parkeringsskipanin** | | |
| 110. | Parkeringsskipanin (Rakstrarj.) | 0 | - |

# § 20 Inntøkur

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -611.681 | 37.582 | 649.263 |
| **Íbúðarmál** | | **25.000** | **-** |
| 20.22.41 Stuðul til rentuútreiðslur | | 25.000 | - |
| . | | | |
| **Rentur** | | **10.332** | **300** |
| 20.50.11 Rentuútreiðslur | | 10.332 | - |
| . | | | |
| 20.50.21 Rentuinntøkur | | - | 300 |
| . | | | |
| **Skattir og avgjøld** | | **2.250** | **648.963** |
| 20.52.11 Kommunuskattur | | - | 620.963 |
| . | | | |
| 20.52.12 Felagsskattur | | - | 18.000 |
| . | | | |
| 20.52.13 Skattur av eftirløn | | - | 10.000 |
| . | | | |
| 20.52.39 Aðrar inntøkur | | 2.250 | - |
| . | | | |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 37.582 | 649.263 |
| Nettostýrt virksemi | - | - |
| Virksemi tilsamans | 37.582 | 649.263 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 25.000 | - |
| Flytingarútreiðslur | 10.332 | - |
| Rakstrarútreiðslur | 2.250 | - |
| Skattir og flytingarinntøkur | - | 649.263 |

## B. Játtanir

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| | - Tús. kr. - | |

### Íbúðarmál

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| **20.22.41 Stuðul til rentuútreiðslur** | | |
| 110. Stuðul til rentuútreiðslur (Stuðulsj.) | 25.000 | - |

### Rentur

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| **20.50.11 Rentuútreiðslur** | | |
| 110. Rentuútreiðslur (Ógreinað j.) | 10.332 | - |
| **20.50.21 Rentuinntøkur** | | |
| 110. Rentuinntøkur (Ógreinað j.) | - | 300 |

### Skattir og avgjøld

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| **20.52.11 Kommunuskattur** | | |
| 110. Kommunuskattur (Ógreinað j.) | - | 620.963 |
| **20.52.12 Felagsskattur** | | |
| 110. Felagsskattur (Ógreinað j.) | - | 18.000 |
| **20.52.13 Skattur av eftirløn** | | |
| 110. Skattur av eftirløn (Ógreinað j.) | - | 10.000 |
| **20.52.39 Aðrar inntøkur** | | |
| 110. Aðrar inntøkur (Ógreinað j.) | 2.250 | - |

# § 25 Gjaldføri

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 0 | 17.739 | 17.739 |
| **Afturgjald av skuld** | | **17.739** | **-** |
| 25.62.11 Afturgjald av skuld | | 17.739 | - |
| . | | | |
| **Útvegan av gjaldføri** | | **-** | **17.739** |
| 25.64.11 Útvegan av gjaldføri | | - | 17.739 |
| . | | | |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 17.739 | 17.739 |
| Nettostýrt virksemi | - | - |
| Virksemi tilsamans | 17.739 | 17.739 |
| Fíggjarpostar | 17.739 | 17.739 |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |

### Afturgjald av skuld

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| **25.62.11** | **Afturgjald av skuld** | | |
| 110. | Afturgjald av skuld (Ógreinað j.) | 17.739 | - |

### Útvegan av gjaldføri

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| **25.64.11** | **Útvegan av gjaldføri** | | |
| 110. | Útvegan av gjaldføri (Ógreinað j.) | - | 17.739 |

# Íløguætlan

| | | 2011<br>J | 2012<br>J | 2013<br>J | **2014**<br>**F** |
|---|---|---|---|---|---|
| **§2** | **Almanna- og heilsumál** | **22.750** | **42.000** | **0** | **1.000** |
| 2275 | Læknahølir | | 2.500 | | |
| 2375 | Tannlæknamiðstøð | | 1.000 | | |
| 2575 | Kommunalar íbúðir | | 1.000 | | |
| 2775 | Boðanesheimið | 22.000 | 36.500 | | |
| 2775 | Ellisheimið | 750 | 1.000 | | |
| 2775 | Eldrarøkt | | | | 1.000 |
| **§3** | **Børn og ung** | | | **3.000** | **5.000** |
| 3175 | Birkilund | | | 3.000 | |
| 3175 | Dagstovnur í Kollafirði | | | | 5.000 |
| **§4** | **Undirvísing** | **54.900** | **12.500** | **6.000** | **0** |
| 4175 | Dagføring av skúlum | 11.000 | 12.500 | | |
| 4175 | Skúlin í Kollafirði | 3.000 | | | |
| 4175 | Eysturskúlin lon E | | | 2.000 | |
| 4175 | Hoyvíkar skúli | | | 2.000 | |
| 4176 | Skúlin við Løgmannabreyt | | | | |
| 4176 | Skúlin á Hamrinum | 32.000 | | | |
| 4176 | Sanka Frans smábarnaskúli | 8.900 | | | |
| 4176 | Vesturskúli | | | 2.000 | |
| **§5** | **Mentan og frítíð** | **11.538** | **37.300** | **32.591** | **43.000** |
| 5175 | Musikkskúli | 4.000 | 8.000 | 1.300 | 3.000 |
| 5375 | Reinsaríið | 1.500 | 1.000 | 3.000 | 2.000 |
| 5375 | Skálatrøð framtíðarætlan | | 3.000 | | |
| 5375 | Müllers pakkhús | | 1.000 | | |
| 5375 | Boðanesgjógv mentanarøki | | 1.000 | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 5475 | Býarbókasavnið kjallarin | | 1.500 | | |
| 5775 | Høllin á Hálsi | | 2.500 | 10.000 | 4.000 |
| 5775 | Høllin í Kollafirði | 1.500 | 2.300 | | |
| 5775 | Høllin í Hoyvík | | | 2.291 | 2.000 |
| 5775 | Ítróttarhøll inni í Vika á Argjum | | | | 1.000 |
| 5775 | Ítróttarhøll við Landavegin | | | | 9.000 |
| 5775 | Tórsvøllur | 4.538 | 4.000 | 10.000 | 12.000 |
| 5775 | Svimjihøll | | 5.000 | 5.000 | |
| 5775 | Baðiland | | | | 1.000 |
| 5775 | Oyggjaleikir/Golfvøllur | | 5.000 | | 3.000 |
| 5775 | Vøllur í Hoyvík | | 2.000 | 1.000 | 6.000 |
| 5775 | Høli til frælsan ítrótt | | 1.000 | | |

| | | **2011**<br>**J** | **2012**<br>**J** | **2013**<br>**J** | **2014**<br>**F** |
|---|---|---|---|---|---|
| **§6** | **Teknisk mál** | **13.600** | **40.000** | **46.700** | **42.000** |
| 6175 | Keyp av bygningum | | | | 10.000 |
| 6275 | Fríðkan av býnum | 1.000 | 2.000 | | 2.000 |
| 6275 | Frílendisætlan Boðanes/Hoydalar | | | | 1.000 |
| 6275 | Lendisgøtur | | | | 1.000 |
| 6275 | Miðbýarætlan | | | 2.000 | 9.000 |
| 6275 | Miðbýarumhvørvi | | 1.000 | | |
| 6275 | Spælipláss í miðbýnum | | | | 2.000 |
| 6275 | Havnará | 1.000 | | | |
| 6475 | Byggibúning bústaðir / í Kollafirði | | | | 1.000 |
| 6475 | Byggibúning bústaðir / Djúpagil | | | | 1.000 |
| 6575 | Kirkjugarðar | 1.000 | 1.000 | 3.000 | 1.000 |
| 6575 | Kirkjugarður í Hoyvík | | 1.000 | | |
| 6775 | Vatnveiting | | 1.000 | | |
| 6875 | Kloakkir | 4.000 | 7.000 | 5.700 | 4.000 |
| 8175 | Aðrar vegaverkætlanir | | | | 1.000 |
| 8175 | Glyvursvegur við brúgv | 2.600 | 10.000 | 25.000 | |
| 8175 | Gongugøtan | | 2.000 | | 1.000 |
| 8175 | Gøta til Hvítanes | | 1.500 | | |
| 8175 | Súkklubreyt | | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| 8175 | Glyvursvegur slitlag | | 1.000 | | |
| 8175 | Rundkoyring við Óluvugøtu | | 2.000 | | |
| 8175 | Vegakervið Dvørgast./undir Borgarah. | | 2.000 | | |
| 8175 | Dvørgastígur | | | 1.000 | 2.000 |
| 8175 | Eystari ringv./Hvítanesv-ljósregulering | | 1.500 | | |
| 8175 | Sundsvegur dagføring | | 2.000 | 6.000 | |
| 8275 | Gøtuljós- Orkusparing og stýringar | | | | 1.000 |
| 8375 | Rakstrargøgn | 4.000 | 4.000 | 3.000 | 4.000 |
| **§7** | **Kommunal virki** | **6.000** | **4.000** | **10.000** | **19.000** |
| 7175 | Renovatión | 4.000 | 2.000 | 10.000 | 19.000 |
| 7476 | Smábátahavn | 2.000 | 2.000 | | |
| | | **108.78**<br>**8** | **135.80**<br>**0** | **98.291** | **110.000** |
| 7475 | Tórshavnar havn | 22.700 | 21.169 | 21.784 | 21.598 |
| | **Samanlagt** | **131.48**<br>**8** | **156.96**<br>**9** | **120.07**<br>**5** | **131.598** |

**Ískoyti:**
Í framlagda uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2014, eru stórar broytingar av nøkrum játtanum til rakstur á tekniska økinum, §6 og §7.

Størstu broytingarnar eru hesar:

| Konto | Rakstrarstað | Viðmerking |
|---|---|---|
| 6109 | Húsaumsitingin | Lækkar við kr. 1.769 mió. Sparing fyri 2014 einans, av tí at tað vegna ávísar umstøður verður avlop frá 2013 at flyta fram til 2014. |
| 6110 | Húsaumsitingin | Lækkar við kr. 3.347 mió. Sparing fyri 2014 einans, av tí at tað vegna ávísar umstøður verður avlop frá 2013 at flyta fram til 2014. |
| 7110 | Renovatión | Hækkar við kr. 500.000. Orsakað av sáttmálaásettari prístalsregulering og regulering fyri tal av ruskposum |
| 7510 | Bussleiðin | Hækkar við kr. 1.500.000. Orsakað av sáttmálaásettari prístalsregulering. |
| | | |

**Tekniska nevnd 9. oktober 2013:** Umrøtt og samtykt at áseta nýggjan fund mánadagin 14. oktober 2013, kl. 16.00.

**Mentamálanevndin 9. oktober 2013:** Umrøtt og áseta nýggjan fund.

**Tilbúgvingarnevndin 10. oktober 2013:** Samtykt at taka undir við framlagda uppskoti til fíggjarætlan 2014.

**Ískoyti:**
Í sambandi við viðgerðina av fíggjarætlanini á fundinum 9. okt. 2013, vóru hesi viðurskifti reist, sum hædd ikki er tikin fyri í fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan fyri 2014:

1. Kto 8210 Gøtuljós: Hædd er ikki tikin fyri, at el-orkuprísirnir eru munandi hækkaðir seinastu árini, eins og umfangið av el-útreiðslum í sambandi við hátíðarhald, so sum ólavsøku, jólabý o.l. somuleiðis er munandi hækkað. Kommunan hevur ikki møguleika at stýra el-prísinum, og tá hesin partur er so stórur partur av konto 8210, má játtanin til hetta hækkast við kr. 300 tús.
2. Kto 8111 Reinhald: Virksemið innan hesa konto er økt í 2013, tá wc í Steinatúni kom undir somu upplatingaskipan sum wc í Mylnugøtu. Í uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2014 er ikki tikin hædd fyri hesum nýggja rakstrarstaðnum. Hetta er einasta almenna wc í miðbýnum, har rørslutarnað hava nøktandi atkomumøguleikar.

Rakstrarkostnaðurin fyri hetta rakstrarstaðið er kr. 400 tús. árliga, til lønir, el, reingerð o.l.

3. Kto 8111 Reinhald: Eitt alment wc var fyri fáum árum síðani latið upp í Kollafirði nærhendis innkoyringina til kirkjuna. Talan var um eina fyribils loysn, sum ikki kann metast at verða nøktandi uppá sikt. Ynski hevur verið frammi um, at gera eina endaliga loysn fyri eitt alment wc á hesum stað, nú Landsverk er í holt við at broyta innkoyringina, sum liður í eini ferðslutryggjan av íbindingini í landsvegin. Talan er um eitt nýtt wc, og harvið eigur málið at viðgerast sum eitt íløgumál.
4. Kto 6109 og 6110 Røkt av bygningum. Nevndin er ivingarsom um, at lækkingin er so stór, og um at peningurin er fluttur til íløgur á øðrum fyrisitingarøkjum, og ikki á tekniska økinum.

**Tekniska nevnd 14. oktober 2013:** Nevndin tekur undir við stóru lækkingini av kto 6109 og 6110 á kr. 5,116 mió, treytað av:

1. at kto 8210 Gøtuljós, verður hækkað við kr. 300 tús. til øktar el-orkuútreiðslur
2. at kto 8111 Reinhaldið, verður hækkað við kr. 400 tús. til nýtt rakstrarstað sum er wc í Steinatúni
3. at kr. 1,0 av lækkingini verður nýtt til íløgu innan tekniska økið, til at gera nýtt wc og bussendastøð við Sjógv í Kollafirði
4. at lækkingin av kto 6109 og 6110 er grundað á serligar umstøður, og einans er galdandi fyri 2014, og tískil ikki er útgangsstøði fyri fíggjarætlanini fyri 2015.

**Trivnaðarnevndin 21. oktober 2013:** Nevndin samtykti fíggjarætlanina, men mælir til, at konta 2640 Stuðul til endamál innan almanna- og heilsumál verður hækkað við kr. 600.000. Endamálið er at umskipa játtanina soleiðis, at tað í størri mun verður talan um at fíggja verkætlanir og menningarætlanir, sum nevndin tekur stig til.

**Mentamálanevndin 21. oktober 2013:** Nevndin samtykti fíggjarætlanaruppskotið sum heild við hesum broytingum:

- At játtað verður kr. 890.000 til framhald av frítíðartilboðnum til 3. flokk
- At játtað verður kr. 350.000 til frítíðarskúlaøkið at hava opið í tíðarskeiðum, tá skúlar hava frí
- At játta kr. 100.000 til Tórshavnar Ungdómsráð
- At játta kr. 200.000 til verkætlanar á ungdómsøkinum – nýggj rakstrarkonta stovnast á grein 3
- At fíggja hetta við at framflyta minninýtslu í inniverandi ári á kontu 3215 ætlað ungdómsvirksemi kr. 790.000 og við at tillaga normeringina á frítíðarskúlunum við kr. -750.000.
- At ongar broytingar verða gjørdar í brúkaragjøldunum í Svimjihøllini, og at inntøku- og útreiðslukarmurin tí lækkar kr. 425.000.
- At nýggj rakstrarkonta verður stovnað á grein 5 til skoytibreytina.

| Konta | Kontuheitið | Lækkar | Hækkar | Viðm. |
|---|---|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1315 | Nevndir og ráð | | 100 | Rakstur av Tórsh. Ungdómsráð. Heldur enn at stovna nýggja kontu, er ikki skilabest at játtanin fer inn á 1315, har sum eldraráðið eisini er? |
| 3215 | Aðrar útreiðslur barnaansing | | 350 | Frítíðarskúlar opið, tá skúlar hava stongt |
| 3215 | Aðrar útreiðslur barnaansing | | 100 | Frítíðarskúlalíknandi tilboð 3. fl - tá vit kenna meira fyri vist, hvussu hetta, ella alternativt eitt klubbatilboð til 3.-5. fl, verður skipað, ber til stovna serstaka kontu. |
| xxxx | Verkætlanir á ungdómsøkinum | | 200 | Stovnast skal nýggj konta á grein 3 børn og ung |
| | Normeringsbroyting frítíðarskúlar 1.-2. fl | 750 | | Nýggjur lykil 2,4, áleið kr. 750.000 |
| | **Í alt** | **750** | **750** | **0** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 5610 | Svimjihøllin | 0 | 0 | Ætlað hækkan í inntøkum og samsvarandi útreiðslukarmi kr. 425 ikki samtykt, nettoútreiðslukarmur tó óbroyttur |
| xxxx | Skoytibreytin | | 530 | Stovnast nýggj konta |
| 5717 | ítróttaranlegg | 530 | | Skoytibreyt tikin úr |
| | **Í alt** | **530** | **530** | **0** |

Um kr. 790.000 verða tøkar við árskifti á 3215, so skal hetta nýtast til framhald av frítíðarskúlatilboðnum til 3. flokk í 2014

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við fíggjarætlanini við teimum broytingum, sum eru samtyktar av mentamálanevndini.

Viðvíkjandi broytingunum hjá teknisku nevnd og trivnaðarnevndini tekur fíggjarnevndin ikki undir við at hækka raksturin og at stovna nýggja íløgukonto til wc í Kollafirði, og verður málið beint aftur í ávikavist teknisku nevnd og trivnaðarnevndina við atliti til at finna fígging innanfyri egin rakstrarstøð.

**Ískoyti:**
Mett verður ov stórt inntriv í rakstrarstøðini á grein 2 at fíggja kr. 600.000 til verkætlanir og menningarætlanir innanfyri karmin. Skotið verður upp ein lægri upphædd kr. 200.000, sí yvirlitið niðanfyri.

| Konta | Kontuheiti | Hækkar | Lækkar |
|---|---|---|---|
| 2101 | Naina | | 35 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 2510 | Serflutningsskipanin | | 35 |
| 2613 | Børn sett heiman í fosturfamilju | | 30 |
| 2615 | Pedagogisk frípláss | | 25 |
| 2617 | Brúkaragjøld, serstovnar | | 30 |
| 2745 | Tiltøk á eldraøkinum | | 15 |
| 2810 | Fíggjarligt frípláss | | 30 |
| 2460 | Stuðul til endamál innan almanna- og heilsumál | 200 | |
| Í alt | | 200 | 200 |

Harumframt verður mett neyðugt at orða kontuheitið og játtanartekstin til kontu 2460 av nýggjum. Kontuheitið kann vera: "Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsuøkið". Játtanarteksturin kann vera hesin: "Endamálið við játtanini er at stuðla tiltøkum og at skipa verkætlanir og menningarætlanir o.líkn. innan almanna- og heilsuøkið."

**Trivnaðarnevndin 28. oktober 2013:** Samtykt at taka undir við uppskotinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Við eini samanbering av fíggjarætlanini fyri 2013 og framlagda uppskotinum fyri 2014 kann staðfestast, at broytingar eru í rakstrarjáttanum á fleiri økjum:

§1 Kommunal fyrisiting, hækkar samanlagt kr. 217 tús.
§2 Almannamál og heilsumál, hækkar samanlagt kr. 4.450 tús.
§3 Børn og ung, lækkar samanlagt kr. -3.920 tús.
§4 Undirvísing, hækkar kr. 170 tús.
§5 Mentan og frítíð, lækkar kr. -68 tús.
§6 Teknisk mál, lækkar kr. -5.248 tús.
§7 Kommunal virkir, hækkar kr. 2.582 tús.

Staðfestast kann, at §6 stendur fyri tí størstu lækkingini, harav konto 6109 og 6110, Umsiting og røkt av bygningum, einsamallar standa fyri einari lækking á kr. -5.116 tús.

Nevndin hevur á fundi 14. okt. 2013 umrøtt stóru lækkingina av konto 6109 og 6110, og tekur sum útgangsstøði ikki undir við eini niðurraðfesting av røkt og umsiting av kommunalum bygningum. Av tí at talan er um serligar umstøður í 2013, og við teirri fortreyt, at henda lækking ikki liggur til grund fyri framskrivingum og játtanum í 2015, er nevndin tó sinnað at taka undir við lækkingini, bert galdandi fyri 2014.

Tá talan er um íløgur, staðfestir nevndin, at játtanin til §6 Teknisk mál, er lækkað í mun til langtíðar íløguætlanina fyri 2014, sum var gjørd í sambandi við íløguætlanina fyri 2013. Størsta lækkingin stavar frá, at játtanin á 30 mió. til Brúgv um Sandá, er flutt til 2015, men hóast hædd verður tikin fyri hesi forskjóting, so lækkar játtanin til §6 lutfalsliga úr kr. 46,7 mió. í 2013 til kr. 43 mió. í 2014, hóast at samlaða íløguætlanin hækkar við nærum 12 mió. kr., úr kr. 98,291 mió. í 2013 til kr. 110 mió. í 2014.

Staðfestast kann tí, at lækkingin av rakstrinum á §6, verður ikki nýtt til meiríløgur undir §6, men á øðrum fyrisitingarøkjum.

Henda raðfesting í uppskotinum til fíggjarætlan ger, at trupult er at finna fíggjarligt rásarúm fyri nýggjum tænastum til borgarar, sosum alment wc í Steinatúni o.l., og til útreiðslur sum kommunan ikki sjálv stýrir, sosum orkuprísir. Nevndin staðfestir samstundis, at onnur nýggj rakstrarstøð á øðrum fyrisitingarøkjum, verða stovnaði.

Hinvegin metir nevndin tað at verða av stórum týdningi at hava eina góða tænastu við almennum wc í Steinatúni, og somuleiðis at lagt verður upp fyri tí serliga stóru ávirkanini av hækkaðum elorkuprísum á konto 8210 Gøtuljós.

Nevndin er tó av tí áskoðan, at lækkingin av konto 6109 og 6110 er longu frammanundan so stór, at møguleiki er ikki hjá nevndini at gera uppaftur størri umraðfestingar fyri tørvinum á kr. 300 tús. til konto 8210 Gøtuljós og kr. 400 tús. til konto 8111 Reinhald, av konto 6109 og 6110.

**Tekniska nevnd 29. oktober 2013:** Nevndin tekur undir við uppskotinum til fíggjarætlan fyri tær konti undir §6 og §7, sum tekniska nevnd varðar av, við hesum broytingum:

1. Kto 8210 Gøtuljós: Hædd er ikki tikin fyri, at el-orkuprísirnir eru munandi hækkaðir seinastu árini, eins og umfangið av el-útreiðslum í sambandi við hátíðarhald, so sum ólavsøku, jólabý o.l. somuleiðis er munandi hækkað. Kommunan hevur ikki møguleika at stýra el-prísinum, og tá hesin partur er so stórur partur av konto 8210, má játtanin til hetta hækkast við kr. 300 tús.

2. Kto 8111 Reinhald: Virksemið innan hesa konto er økt í 2013, tá wc í Steinatúni kom undir somu upplatingaskipan sum wc í Mylnugøtu. Í uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2014 er ikki tikin hædd fyri hesum nýggja rakstrarstaðnum. Hetta er einasta almenna wc í miðbýnum, har rørslutarnað hava nøktandi atkomumøguleikar. Rakstrarkostnaðurin fyri hetta rakstrarstaðið er kr. 400 tús. árliga, til lønir, el, reingerð o.l.

3. At fíggja hækkingina av konto 8210 við kr. 300 tús. og konto 8111 við kr. 400 tús., við at framflyta minninýtslu í inniverandi ári á konto 7610 Parkingsskipanin.

4. Nevndin samtykti eisini at heita á býráðið um at gera umraðfestingar í uppskotinum til íløguætlan, soleiðis at kr. 1,0 mió. verða játtaðar til íløgu í nýggja bussendastøð við almennum wc við Sjógv í Kollafirði.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2013:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og við pkt. 1-3 hjá teknisku nevnd við teirri viðmerking, at um kr. 700.000 verða tøkar við árskifti á konto 7610 parkeringsskipan, so skal hetta flytast til konto 8210 gøtuljós við 300.000 og 8111 reinhald við kr. 400.000.

Viðv. pkt. 4 í samtyktini hjá teknisku nevnd verður spurningurin um wc-facilitetir við endastøðir hjá bussleiðini tikin upp í sambandi við evnisdagin um bussleiðina.

Fíggjarætlanin beind í býráðið.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Einmælt samtykt.

**191/13** **<u>2013-2335</u>**

**<u>Fíggjarætlan fyri 2014 hjá Tórshavnar havn</u>**

Sambært kommunustýrisskipanaini skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið til komandi fíggjarætlan.

Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

**Vinnunevndin 7. oktober 2013:** Nevndin samtykti at góðkenna fíggjarætlanina fyri 2014 og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við vinnunevndini.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Einmælt samtykt.

**192/13** **<u>2013-1652</u>**

**<u>Keyp av lendi til kommunala útstykking í Hoyvík (Djúpagil)</u>**

Í sambandi við omanfyri nevndu útstykking skal kommunan ogna sær uml. 14.000m² frá Jarðarráðnum.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at keypa lendið til útstykkingina sambært notat. 2013-1652/3.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 1,6 mió. av konto 6175 L610021 til konto 6475 L64004 og beina mælið í býráðið.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Einmælt samtykt.

**193/13** **2013-1865**

**Reinsaríið – tilboð uppá høvuðsarbeiðstøku**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Lisitatiónsúrslit:
Í sambandi við arbeiðið at at gera Reinsaríið til spælistað, var fyri uml. 2 mánaðum síðani arbeiði við niðurtøku og ísblásing av gamla timbrinum boðið út og sett í verk, meðan restin av útbjóðingartilfarinum var gjørt klárt. Tilboðini upp á hesi arbeiðini upp á uml. kr. 520.000 u/mvg.

Lisitatión í sambandi við restina av arbeiðinum, var hin 16. juli 2013. Fimm virkir vóru innboðin at lata inn tilboð, og trý teirra lótu inn tilboð.

Tilboðini vóru hesi:
Húsavarðartænastan: 4.947.191,- u/mvg
Træsmiðjan: 6.449.032,- u/mvg
Articon: 7.966.393,- u/mvg

Arkitekturin hevur eftirkannað tilboðini, og mælir til at taka av lægsta tilboðnum, frá Húsavarðatænastuni.

Fíggjarviðurskifti:
Við grundarlagi í omanfyri nevndu tilboðum upp á niðurríving, ísblásing og høvuðsarbeiðstøku, umframt keyp av elevatorstóli, projektering, eftirlit, byggiharraútreiðslur, ókent og mvg er samlaða kostnaðarmetingin fyri arbeiðið kr. 7.626.000,-.

Útgerð og innbúgv, sum ikki er beinleiðis partur av byggiarbeiðinum, er ikki íroknað (t.e. stólar, borð, diskur, mixarapultur, hátalarar o.l.)

Býráðið hevur í 2012 og 2013 játtað samanlagt kr. 7.084.000 til verkætlanina, og resta sostatt kr. 542.000 í.

Umsitingin hevur mett, at teir sparimøguleikar sum eru í verkætlanini, sum muna nóg mikið, um tær 542.000 kr. skulu finnast við sparingum, minka um góðskuna av verkætlanini og viðføra inntriv, sum hava týðandi ávirkan á útsjónd og arkitektur. Umsitingin mælir tí til at játta kr. 542.000 afturat til verkætlanina.

Eykajáttan á kr. 542.000 til byggiarbeiði og játtan til innbúgv og útgerð kann takast við í íløguætlanina fyri 2014, tí partur av arbeiðinum verður gjørt í 2014. Ella kann peningurin játtast av íløgukarminum fyri 2013, við at gera umraðfestingar av íløgunum fyri 2013.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til fylgjandi:

1. at játtaðar verða kr. 542.000 afturat til verkætlanina, við flyting av kto. 4175-L41008 E-lonin í Eysturskúlanum, til kto 5375-L53002 Reinsaríið.

2. at hædd verður tikin fyri neyðugu fíggingini til útgerð og innbúgv til Reinsaríið í íløguætlanini fyri 2014.

Tilmælið omanfyri undir pkt. 1 er treytað av, at hædd verður tikin fyri neyðugu fíggingini til E-lonina í Eysturskúlanum í íløguætlanini fyri 2014.

Í øðrum lagi verður mælt til, at hædd verður tikin fyri fíggingini til bæði pkt. 1 og pkt. 2 í íløguætlanini fyri 2014.

**Mentamálanevndin 2. august 2013:** Nevndin samtykti at mæla til, at játtaðar verða kr. 542.000 afturat til verkætlanina, við flyting av kto. 4175-L41008 E-lonin í Eysturskúlanum, til kto 5375-L53002 Reinsaríið, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Býráðslimir tóku um teldupost undir við at seta samtyktina hjá mentamálanevndini í verk at formliga góðkenna á seinni fundi í fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og við eykajáttan játta kr. 542.000,00 afturat til verkætlanina við flyting av kto. 4175-L41008 E-lonin í Eysturskúlanum, til kto 5375-L53002 Reinsaríið og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 16. september 2013:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Einmælt samtykt.

**194/13** **2013-1022**

**Berjabrekka 3**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Nevndin fyri sjálvsognarstovnin Berjabrekka 3, hevur á nevndar fundi 3. apríl 2013 samtykt at avvikla sjálvsognarstovnin og at afturgjalda stovnarunum peningin.

Roknskapurin verður uppgjørdur í løtuni, men mett verður at Tórshavnar kommuna fær uml. 1.8 mió kr. afturgoldnar. Víðari samskifti í málinum fer fram millum Tórshavnar kommunu og Bústaðir.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Tikið til eftirtektar.

Borgarstjórin luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt

**Ískoyti:**
Í sambandi við uppgerð av Sjálvsognarstovninum Berjabrekka 3 hevur kommunan móttikið kr. 1.859.071,74. Upphæddin er bókað á 20910 sum óvæntað inntøka.

**Tilmæli:**
Fyrisitingarstjórin og leiðarin á fíggjardeildini mæla til at flyta játtan á 1.859 t.kr. av konto 20910 aðrar inntøkur til konto 6175 – L61011-L6101 BankNordik, Keyp av bygningum.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til við eykajáttan at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Einmælt samtykt.

**195/13** **2012-0732**

**HIT húsið – House of innovation Tórshavn (ìverksetarahús í Kongagøtu)**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Ætlanin er at kanna møguleikan fyri at seta á stovn Íverksetarahús í Tórshavn. Tað er alneyðugt, at fleiri vinnuvirkir verða sett á stovn í kommununi, og kundi hetta tiltakið stuðla undir tí.

Íverksetarahúsið kann betra um vakstrarmøguleikarnar hjá íverksetarum. Kommunan er við til at skapa eitt umhvørvið, soleiðis at íverksetarar kunnu læra av hvørjum øðrum v.m. Samstundis er møguleiki fyri at savna vitan, sum kann stuðla íverksetarum, eitt nú innan fígging, útflutningur, marknaðarføring, patent v.m.

Kommunan innrættar íverksetarahúsið við skrivstovum, fundarhøli, køki, atgongd til streym, net og printara. Telduútgerð og telefonir útvega íverksetarar sjálvir.

Virsksemið má ikki vera kappingaravlagandi. Tí er neyðugt at seta karmar upp fyri húsið. Millum annað má støða taka til:

- Hvussu leingi kann ein íverksetari vera inni í húsinum?
- Hvussu nógvar fermetrar ella fólk kann ein fyritøka hava inni í húsinum?
- Skulu avmarkingar setast fyri, hvør kann vera í húsinum?
- Húsaleiga?

Kommunan setir hús til taks, men virksemið skal hvíla í sær sjálvum.

Møguligt skal vera at leiga eitt skrivaraborð í ein dag, ella eitt høli í mðr. Etableraðar fyritøku skulu eisini kunna leiga fundarhøli t.d. til videoráðstevnur. Møguleiki eigur eisini at vera fyri at skapa samstarv millum íverksetarar og fyritøkur í kommununi.

Húsið skal verða smart, eggja til skapan og bjóða uppá hentleikar, tíðarrit o.l. so uppfinnaratýpur, designarar, rithøvundar, app-mennarar trívast.

Íverksetarahús kann setast á stovn í Kongagøtu. Uppstarturin verður fíggjaður av konto 7310 Vinnustrategi. Kommunan kundi heitt á Áka Johansen, fyrrverandi sendimann og starvsfólk á Menningarstovuni um at orða upprit til karm fyri húsið, sum verður at leggja fyri fíggjarnevndina aftur á næsta fundi.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur saman við arkitekti gjørt nærri kanningar av møguleikanum at gera Kongagøtu 7 um til íverksetanarhús. Mett verður, at verkætlanin letur seg fremja, men at tað má gerast stigvíst, grundað á fíggjarlig viðurskiftir og tørv.

Í fyrsta byggistigi verða tvær hæddir innrættaðar. Tvær tær seinnu hæddirnar og fasada verða innrættaðar seinni, tá írestandi fígging er fingin til vega, vónandi partvíst frá sponsorum millum vinnulívið í býnum og/ella íleggjarum aðrastaðni.

Tvær tær fyrstu hæddirnar verða innrættaðar av nýggjum. Gjørt verður eitt fundarhøli, ein køkur/upphaldsrúm, tvey vesi, har annað er til rørslutarnaði, og eitt kopi/goymslurúm. Restin verður innrættað til einkult skrivstovur og felagsskrivstovuhøli.

Eins og gjørt verður í grannalondum, verður skipað fyri samstarvi við verandi vinnulív og útbúgvingarstovnar í Tórshavnar kommunu um ráðgeving, verkætlanir og virksemi

húsinum í heila tikið. Fróðskaparsetur Føroya og Vinnuhúsið hava víst áhuga fyri ætlanini.

Ætlanin er at skipa fyri nøkrum sponsurpakkum, ið gera tað møguligt hjá vinnuni at stuðla íverksetanarhúsinum og afturfyri fáa umrøðu í faldarum, heimasíðu, apps o.l. hjá húsinum. Ynski er eisini um at byggja upp eitt størri samstarvsforum millum vinnu og umsiting í høvuðsstaðnum.

Reglugerð verður gjørt fyri húsið, sum ásetur, hvør hevur ábyrgdin av húsinum, hvør kann fáa innivist í húsinum, undir hvørju treytum og hvussu longi. Sett verður upptøkunevnd at meta um, hvørt hugskot hjá íverksetarum eru somikið búgvið og burðadygg í longdini, at viðkomandi kann fáa innivist.

Leigikostnaður og hvat fæst fyri leiguna, depositum, uppsagnartíð o.l. verður ásett í standard leigusáttmála.

Umvæling av húsinum er mett at kosta uml. 4 mió. kr. Fyrsti partur er mettur til uml. 2 mió. kr.

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at taka undir við, at húsið í Kongagøtu 7 verður brúkt til íverksetarahús.

Fyrsti partur verður fíggjaður soleiðis:
Konto 7310 Vinnustrategi, framflutt frá 2011 kr. 1,25 mió.
Konto 7310 Vinnustrategi, játtan 2012 kr. 0,4 mió.
Konto 1313 Teknisk fyrisiting, framflutt frá 2011 kr. 0,5 mió.

Biðið verður um, at kr. 0,5 mió verða fluttar frá 1313 til 7310 sum eyka játtan.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Tíðin stendur ikki í stað og tíðin hevur ikki arbeitt fyri Tórshavnar kommuna seinastu árini. Almennir stovnar og skúlar verða fluttir á bygd og fiskivinnan er fánað burtur. Meiri lív kundi verið í miðbýnum og barnatalið minkar.

Kommunan eigur at viðvirka til, at dynamikkurin og skapanarhugurin, ið er í einum býi, sum hevur rætta lutfallið millum privatu vinnuna og almen starvspláss, hevur betri sømdir. Samstarvið millum Tórshavnar kommunu og vinnulívið má betrast.

Vit mugu í tættan dialog við vinnuna, so at vinnulívið kennir, at vit eru viðspælarar. Vit mugu gera karmarnar um vinnulívið meira fjøltáttaðar, og hava eitt breiðari fokus.

At gera keikant og stór ídnaðarstykki er gott, men fyri eina framsøknað kommunu er neyðugt við einum breiðum vinnulívspolitikki. Vit mugu skapa betri vakstrararmøguleikar hjá teimum, ið hava góð hugskot.

Her er HIT-húsið ein sera góð byrjan og eitt ógvuliga sterkt signal at senda. Eitt signal, ið ikki kann undirmetast og sum ein høvuðsstaður kann branda seg við.

**Tilmæli**
Stjórnin mælir býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at taka undir við, at húsið í Kongagøtu 7 verður brúkt til íverksetarahús og at fíggja húsið soleiðis:

Fyrsti partur verður fíggjaður soleiðis:
Konto 1110 Býráð kr. 200.000
Konto 1311 Miðfyrisitingin kr. 300.000
Konto 1560 Tænastumannaeftirlønir kr. 200.000
Konto 7310 Vinnustrategi, kr.  942.000
Konto 5373 Skálatrøð framtíðarætlan kr. 1.000.000

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 1. november 2012:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Anfinn Brekkstein, Inga Dahl og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**Býráðið 13. desember 2012:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Anfinn Brekkstein, Inga Dahl og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**Vinnunevndin 25. februar 2013:** Kunnað varð um málið og avgjørt varð at fara til verka.

**Ískoyti**
Arbeitt hevur verið víðari við málinum um at skipa nýskapanarhús í Kongagøtu 7, m.a. hava fundir verið við Vinnuframa um tørv og stuðulsmøguleikar. Vinnuframi er áhugað í

at vera við í eini verkætlan í Tórshavnar kommunu við at stuðla nýskapandi vinnum t.d. við húsaleigukostnaði.

Arbeitt hevur eisini verið víðari við ætlanini at umbyggja bygningin í Kongagøtu 7 til nýskapanarhús, men mett verður at ov nógv skal gerast við húsini fyri at laga tey til nýggja innihaldið.

Tá saltsølubygningurin er liðugt inrættaður, er ætlanin at hýsa nýskapandi virksemi har. Men fyri at fáa gongd á virksemi sum skjótast verður mælt til at byrja í øðrum bygningi fyribils.

Býráðið hevur avgjørt at selja fleiri bygningar, nú umsitingin verður savnað í BankNordik bygninginum. Ein av hesum bygningum er í Niels Winthers gøtu, sum barna- og ungdómsdeildin húsast í. Hesi hús er væl egnað til íverksetarahús – støddin hóskar væl, tey liggja sentralt og sjónliga og eru klár at brúka uttan umbygging ella umvæling av nøkrum slag. Mælt verður tí til at útseta søluna av hesum bygningi, og brúka hann til nýskapanarhús, til saltsølubygningurin er liðugt inrættaður. Mælt verður somuleiðis til at selja ognina í Kongagøtu 7.

Samstundis verður mælt til at skipa nýskapanarhús við dagligum leiðara í eina royndartíð á tvey ár. Uppgávan verður at skipað fyri samstarvi við vinnulív og útbúgvingarstovnar í kommununi um nýskapanarvirksemi.

Reglugerð verður gjørd fyri húsið, sum ásetir, hvør kann fáa innivist í húsinum, undir hvørju treytum og hvussu leingi.

Leigukostnaður og hvat fæst fyri leiguna, depositum, uppsagnartíð o.l. verður ásett í standard leigusáttmála.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at

- Brúka húsini hjá kommununi í Niels Winthers gøtu til nýskapanarhús, til saltsølubygningurin er liðugt umvældur
- Selja ognina hjá kommununi í Kongagøtu 7
- Játta 2 mió kr. av teimum 2.642.000 kr., ið vórðu játtaðar at fíggja nýskapanarhús í Kongagøtu 7 til at fíggja eina 2 ára royndarverkætlan við nýskapanarhúsi í Niels Winthers gøtu.
- At umsitingin ger uppskot til reglugerð fyri húsið at leggja fyri nevndina aftur.
- At nevndin finnur húsinum eitt hóskandi navn

**Vinnunevndin 2. august 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, og at nevna nýskapanarhúsið Hugskotið, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og nevna húsið *Nýskapanarhúsið Hugskotið* og við eykajáttan játta kr. 2 mió. frá konto 7375 vinnuverkætlanir L73001 HIT-húsið - til 7310 vinnustrategi.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Einmælt samtykt.

**196/13** **<u>2010-2717/22 SG</u>**

**<u>Yvirlit yvir lidnar verkætlanir og aðrar verkætlanir – um at gera upp og loka</u>**

**Málslýsing - samandráttur**
Í sambandi við viðgerðina av fíggjarætlanini fyri 2011 (j. nr. 2010-0547), legði borgarstjórin á býráðsfundi hin 11. nov. 2010 fram yvirlit yvir lidnar og aðrar verkætlanir (j. nr. 2010-2717/1), – ið heitt verður á avvarðandi nevndir um at gera upp og loka og síðani at leggja fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina uppskot um at nýta avlopið til nýggjar verkætlanir sbr. skjali um uppgerð yvir lidnar verkætlanir og nýggjar verkætlanir.

Ein meiriluti í býráðnum samtykti at taka undir við at heita á avvarðandi nevndir um at gera upp og loka slíkar verkætlanir.

Á trivnaðarøkinum er talan um niðanfyri standandi verkætlanir at gera upp og loka:

| § 2 | Almanna- og heilsumál | | | Nýggjar verk. | Saldo |
| --- | --- | --- | --- | --- | --- |
| | 2775 | Saldo lidnar verkætlanir | 488 | | |
| | 2275 | Nýggj læknahøli | 250 | | |
| | 2775 | Vardar íbúðir | 1.015 | | |
| | 2775 | Røktarheim yvir við strond | 1.064 | | |
| | | *Køkur Ellisheim* | | 1.850 | |
| | | *Kommunulæknaskipanin* | | 950 | |
| | | Nýggj Saldo | | | 17 |

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at taka undir við at loka lidnar og aðrar verkætlanir, og at játta peningin til aðrar verkætlanir sambært omanfyri standandi yvirliti.

**Sosiala nevnd 7. desember 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Býráðið hevur samtykt umraðfestingar av íløgum í 2013, sum m.a. skulu fíggjast við avlopum av ávísum verkætlanum.

Einki ítøkiligt virksemi hevur verið í verkætlanini at byggja út Ellisheimið til tess at betra um køks- og goymsluumstøðurnar. Upprunaliga játtanin var kr. 1.850.000 (konta 2775, L27003). Brúktar eru kr. 28.000 tilsamans árini 2010, 2011 og 2012 til innanhýsis útreiðslur í sambandi við tekningar og mátingar. Avlopsupphædd at loka er sostatt kr. 1.823.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at loka málið og flyta avlopið til kontu 6175 L61002 keyp av bygningum.

**Trivnaðarnevndin 26. august 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Einmælt samtykt.

**197/13** **<u>2011-0604</u>**

**Viðvíkjandi útstykking á Lygnnesi í Kollafirði**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**

Umsitingin hevur arbeitt við at útstykkja kommunalu ognina, matr. nr. 203c í Kollafirði. Fyri at fáa eina so góða útstykking sum til ber, er uppskot til útstykkingarætlan gjørd í samráð við grannar til kommunalu ognina, matr. nr. 209, 308 og 309 í Kollafirði.
Ætlanin er at útstykkja soleiðis, at tað verða 10 grundstykkir til sethús sum eru uml. 500 m² til víddar. 4 grundstykkir liggja inni á kommunalum øki, 3 á privatum øki, og 3 liggja bæði á kommunalum og privatum øki.
Neyðugt verður at gera ein 8 m breiðan veg, sum verður 74 m langur við einari gongubreyt frá núverandi vegi á Lygnnesi.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í umráðisparti A1 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Matr. nr. 203c er 6.563 m² til víddar.Eigari:Tórshavnar kommuna
Matr. nr. 209 er 975 m² til víddar. Eigari: Dania Dam
Matr. nr. 308 er 1.548 m² til víddar. Eigari: Jógvan Dam
Matr. nr. 309 er 1.840 m² til víddar. Eigari: Jens Andreas Dam.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

**Fíggjarligt:**
Kommunan hevur biðið Una Patursson, verkfrøðing um eina kostnaðarmeting av vegnum og er upphæddin uml. 2 mió. kr. Tá er projektering, eftirlit og byggileiðsla við, men ikki mvg.
Kommunan má leggja út fyri arbeiðini, ið verður afturgoldið tá stykkini eru seld.

**Viðmerkingar frá Teknisku deild:**

**Skjøl:**
2011-0604

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at umsitingin, í samráð við grannarnar ger serstaka byggisamtykt fyri økið, at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið í fíggjarnevndina við atliti til fígging av ávegis kostnaðinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. apríl 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kommunan hevur í samráð við eigarnar gjørt uppskot um serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 203c, 209, 308 og 309. Ætlanin er at útstykkja soleiðis, at tað verða 10 grundstykkir til sethús sum eru uml. 500 m² til víddar. 4 grundstykkir liggja inni á kommunalum øki, 3 á privatum øki, og 3 liggja bæði á kommunalum og privatum øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 203c, 209, 308 og 309 á Lygnnesi í Kollafirði.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. mai 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 26. mai 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Samráðingar hava verið við ánarnar av grannaognunum til útstykkingina, ið undir ávísum treytum eru sinnaðir at vera við í útstykkingini.

Í sambandi við útstykkingina, lata privatu ánararnir nakað av øki og nakað verður makaskift.

Verandi ánarar av grannaognunum koma at eiga 3 av teim niðastu 10 stykkjunum sum privat ogn. Hesir skulu, í sambandi við útstykkingina, rinda teirra part sambært vanligu reglunum. Viðvíkjandi luttøku í vegagerðini, so skulu verandi privatu ánarar rinda teirra part tá teir skulu brúka vegin, t.d. tá teir søkja um byggiloyvi ella ætla at byggja, tó í seinasta lagi 10 ár eftir at útstykkingin er framd.

**Tilmæli**
Miðfyrisitingarstjórin og leiðarin av starvsfólka- og løgdeildini mæla til at gera avtalu við ánararnar um útstykkingina sambært omanfyristandandi leisti og at játtað upp til 2,7 mió. kr. fyri at fremja útstykkingina fíggja av konto 6175 keyp og sølu av fastari ogn.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og at játta upp til 2,7 mió. kr. fyri at fremja útstykkingina, at fíggja av konto 6175 keyp og sølu av fastari ogn.

**Býráðið 26. januar 2012:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 23. februar 2012:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Kommunan hevur fyrilagt privatu eigarunum eina avtalu. Skjal 2011-0604/32

Privatu eigararnir hava munliga váttað at teir vilja undirskriva avtaluna.

**Tilmæli:**
Leiðarin í løgdeildini og kommunustjórin mæla til at fíggjarnevndin góðkennir avtaluna við privatu eigararnar.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Samtykt at taka undir við uppskotinum til avtalu.

Limirnir í staðbundnu spyrja hvussu gongur við útstykkingi.

**Kollafjarðanevndin 10. september 2013:** Leiðarin á løgdeildini kunnaði um málið.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Einmælt samtykt at taka undir við uppskotinum til avtalu.

**198/13** **<u>2013-2330 KF</u>**

**<u>Uppskot til broyting av almennu byggisamtyktini</u>**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Í sambandi við endurskoðan og nútíðargerð av almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu (j. nr. 2009-0216) vóru nógvar broytingar gjørdar í byggisamtyktini. Í einstøkum førum eru mistøk komin fyri t.d. at broytingar av einstakari áseting kann ávirka aðrar ásetingar osv.

Í umráðispørtunum A1 og A3 í 3. grundumráði (kap. 4, §5 og §7) vóru nýggjar ásetingar gjørdar um hús við einvegis takhalli. Hetta var ikki gjørt í 1. og 2. Grundumráði (kap 4, §2 og §3). Eisini vóru hæddir roknaðar frá miðaljørðildi til yvirsill og mønu broyttar til hædd roknað frá planering til hægsta punkt við útvegg.

Tað, at ásetingar um einvegis takhall í 1. og 2. grundumráði mangla í endurskoðaðu byggisamtyktini, er ein feilur, sum forðar fyri nútíðar byggilist. Tí verður mælt til at broyta byggisamtyktina soleiðis.

Nýggj stk. 5 í kap. 4, §2 – Ásetingar fyri 1. grundumráði

> "Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 11 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 13 m."

Verandi stk. 5 verður síðani stk. 6 osv.

Nýggj stk. 5 í kap. 4, §3 – Ásetingar fyri 2. grundumráði

> "Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 8 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 10 m."

Verandi stk. 5 verður síðani stk. 6 osv.

Í ásetingin stk. 4 í kap. 4, §2 – Ásetingar fyri 1. grundumráði og kap. 4, §2 – Ásetingar fyri 2. grundumráði, stendur um hæddir "Hús mugu einans verða bygd í mesta lagi 4 hæddum umframt nýttum lofti..." og "Hús mugu einans verða bygd í mesta lagi 3 hæddum umframt nýttum lofti...". Hesar ásetingarnar samsvara ikki rættuliga við mest loyvdu hædd á bygninginum, tí verður mælt til at hesar orðingarnar verða tiknar burturúr byggisamtyktini.

Kap. 4, §2, stk. 4 – Ásetingar fyri 1. grundumráði

> Hús mugu einans verða bygd í mesta lagi í 4 hæddum umframt nýttum lofti og ikki vera hægri enn 11 m til hægsta punkt við útvegg og 13 m til mønuna. Kjallarin verður roknaður sum húsahædd.

Verður broytt til

> Hús mugu ikki verða bygd hægri enn 11 m til hægsta punkt við útvegg og 13 m til mønuna. Kjallarin verður roknaður sum húsahædd.

Kap. 4, §3, stk. 4 – Ásetingar fyri 2. Grundumráði

> Hús mugu einans verða bygd í mesta lagi í 3. hæddum umframt nýttum lofti og ikki verða hægri enn 8 m til hægsta punkt við útvegg og 10 m til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.

Verður broytt til

> Hús mugu ikki verða bygd hægri enn 8 m til hægsta punkt við útvegg og 10 m til mønuna Kjallari verður roknaður sum húsahædd.

Ein annar feilur í sambandi við endurskoðanina av byggisamtyktini var í kap. 4, §26 – Greiningar, útrokningar av nýtslustigum o.a. – í stk. 4.

> Víddin á hvørjari einstakari hædd verður roknað frá útsíðum á útveggjum. Eldverjuveggir ella tílíkir, ið tvey hús hava í felag, verða roknaðir hvørjum húsum til helvtar av veggjatjúktini. Kjallari verður eisini roknaður til gólvvíddina. Er eingin kjallari, kann byggivaldið fyri vanlig sethús loyva, at 10% verður lagt aftur at mest loyvda nýtslustignum.

Her er bert "nýtslustignum" og ikki "byggistignum", sum tað var í upprunaligu byggisamtyktini. Mælt verður tí til at broyta ásetingarnar fyri kap. 4, §26 stk. 4 frá ".......at 10% verður lagt afturat mest loyvda **nýtslustignum**" til ".......at 10% verður lagt afturat mest loyvda **byggi- og nýtslustignum**"

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin mælir til, at fylgjandi broytingar verða gjørdar í almennu byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu:

Nýtt stk. 5 í kap. 4, §2 – Ásetingar fyri 1. grundumráði

> Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 11 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 13 m.

Nýtt stk. 5 í kap. 4, §3 – Ásetingar fyri 2. grundumráði

> Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 8 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 10 m.

Kap. 4, §2, stk. 4 – Ásetingar fyri 1. grundumráði

> Hús mugu einans verða bygd í mesta lagi í 4 hæddum umframt nýttum lofti og ikki vera hægri enn 11 m til hægsta punkt við útvegg og 13 m til mønuna. Kjallarin verður roknaður sum húsahædd.

Verður broytt til

> Hús mugu ikki vera bygd hægri enn 11 m til hægsta punkt við útvegg og 13 m til mønuna. Kjallarin verður roknaður sum húsahædd.

Kap. 4, §3, stk. 4 – Ásetingar fyri 2. Grundumráði

> Hús mugu einans verða bygd í mesta lagi í 3 hæddum umframt nýttum lofti og ikki verða hægri enn 8 m til hægsta punkt við útvegg og 10 m til mønuna Kjallari verður roknaður sum húsahædd.

Verður broytt til

> Hús mugu ikki verða bygd hægri enn 8 m til hægsta punkt við útvegg og 10 m til mønuna Kjallari verður roknaður sum húsahædd.

Ásetingarnar fyri kap. 4, §26 stk. 4 frá ".......at 10% verður lagt afturat mest loyvda **nýtslustignum**" til ".......at 10% verður lagt afturat mest loyvda **byggi- og nýtslustignum**"

**Tekniska nevnd 9. oktober 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Einmælt samtykt.

**199/13** **<u>2013-2337</u>**

**<u>Lækka leiguna hjá Carello</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsókn frá Carello um at lækka leiguna á grundøkinum á bygninginum, sum stendur undir Krákusteini á Eystara havnaøki í Tórshavn. Eisini verður søkt um at leigusáttmálin verður longdur til 20 ár.

Talan er um grundøkið undir fyrrverandi kaffivogningum undir Krákusteini, har Margit Hansen Olsen hevði kaffisølu, til hon gavst í 2008. Síðani Margit gavst, hava tað fleiri ferðir verið eigaraskifti.

Í 2012 yvitók Sp/F Rúni Djurhuus leigumálið, og bygningurin verður nú brúktur sum matarstað.

Tá leiguavtalan bleiv gjørd í 2008, var árliga leigan kr. 24.000,- um árið, og kundi ikki uppsigast fyrr enn í 2016.

Í sambandi við eigaraskifti í 2009, bleiv sáttmálin longdur fram til 2021.

Aðrir leigusáttmálar til kioskir og pylsuvognar á havnaøkinum, eru í prísi á umleið sama støði, men kunnu uppsigast við 6 mðr. freist.

Í skrivi frá eigarunum, dagfest 24. september 2013, verður søkt um at fáa leiguna niðursetta til kr. 12.000,- um árið.

Í øðrum lagi verður skotið upp, at Tórshavnar havn keypir bygningin, og leigar hann út fyri kr. 120.000,- um árið.

Grundgevingin fyri umsóknini er, at útreiðslur til lánsgjøld, el og grundøki eru so høgar, at virksemið gevur hall.

Eisini verður sókt um at leigumálið verður longt fram til 2033, ella í øðrum lagi framlongdur við 10 árum, tá hann gongur út í 2021.

**Viðmerking:**
Sáttmálar av hesum slagnum, hava í mesta lagi verið 5 ára leigusáttmálar. Aftan á at stórar íløgur vóru gjørdar í verðandi bygning, gekk havnarnevndin í 2008 við til at gera ein 8 ára leigusáttmála, og aftur í 2009 at gera ein 12 ára leigusáttmála.

Um Tórshavnar havn uppsigur leigusáttmálan, áðrenn hann er útgingin, má útleigarin (TH) finna annað høgligt grundøki, og helst gjalda fyri flyting.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
**Leiguupphædd:** Við tí í huga, at leiguupphæddin var kend fyri leigarunum, tá hann yvirtók leigumálið, og at leiguupphæddin er á sama støði, sum aðrir leigusáttmálar á havnaøkinum til sama endamál, verður mælt til at halda fast við.

**Leinging av leigusáttmála:** Leigari og lánveitari hava havt kunnleika til leigusáttmálan, og hava áður fingið hann framlongdan. Mælt verður til halda fast við at leigumálið gongur út í 2021. Møguleiki er hjá leigaranum at søkja um leinging, tá tað nærkast fram móti 2021.

**Vinnunevndin 7. oktober 2013:** Nevndin samtykti ikki at ganga umsóknini um at lækka leigukostnaðin á møti. Eisini samtykti nevndin at leingja leigusáttmálan til 2028 og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við vinnunevndini.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Bjørghild Djurhuus luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Einmælt samtykt.

**200/13** <u>**2013-2358**</u>

<u>**Bíðilisti til bátapláss**</u>

| **Stað** | | **Bíðilista** | **Tøk** |
|---|---|---|---|
| **Tórshavn/Argir:** | Tórsh, Argir, Hoyvík, Hvítanes | 287 | 0 |
| **Gamlarætt:** | Kirkjubø, Velbast, Syðrad, Norðad. | 0 | 0 |
| **Hestur** | Hestur | 0 | 4 |
| **Nólsoy:** | Nólsoy | 0 | 5 |
| **Kaldbak/Kaldbaksb.** | Kaldbak, Kaldbaksbotnur | 6 * | 0 |
| **Kollafjørð/Signabø** | Kollafjørð, Signabø | 0 | 6 |

*innan ársskiftið verða 5 teymar lagdir út í Kaldbak, tá verður ein á bíðilista.

**Vinnunevndin 7. oktober 2013:** Nevndin samtykti at tað kostar kr. 2.000,00 í depositum fyri at standa á bíðilista fyri at fáa bátapláss í Tórshavnar kommunu.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við vinnunevndini við teirri broyting, at depositum verður ásett til kr. 1.000,00.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Hallu Samuelsen, um at samtykkja tilmæli frá Vinnunevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og ongari í móti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Halla Samuelsen, Tróndur Sigurðsson og Marin Katrina Frýdal.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jákup Dam.

**201/13** **<u>2013-0562 MSH</u>**

**<u>Útleiðingar út á Sjógv frá Sandvíkarhjalla og Yviri við Strond (Eystfalssker-Válgaravík-Kommandørhúsunum)</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært góðkendari spillivatnsætlan hjá kommununi, er ætlanin at fara undir at gera arbeiðið liðugt at leiða kloakkirnar frá Sandvíkarhjalla og Yviri við Strond út á sjógv. Talan er um arbeiði á økinum við Eystfalssker, Válgaravík og undir Komandørhúsunum og út á streymasjógv.

Arbeiðini fara at fevna um at dagføra verandi útleiðingar, so at hesar framyvir lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni við at leiðingarnar koma út minst 1 m undir størstu fjøru.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaða arbeiðið er mett at kosta kr. 2.500.000,- og er ynski um at fáa heimild at gera útbjóðingartilfar, bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión og leggja fyri nevnd aftaná. Ætlanin er at arbeiðið skal byrja í vár.

Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir í 2013 er 5,7 mió. kr. og er ætlanin at nýta 2,5 mió. kr. til dagføring av útleiðingunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta kr. 2.500.000,- av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2013, konto 6875 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Avgjørt var at bjóða útleiðingarnar á sjógv sum 4 arbeiðstøkur, og var lisitatión hildin 18. juni 2013, kl. 14.00.

Arbeiðstøkurnar vóru hesar:
1. Kloakkútlát á Hvítanesi
2. Kloakkútlát Válgaravík Norður
3. Kloakkútlát Válgaravík Suður
4. Kloakkútlát Eystfalssker

Umsitingin hevur latið gera lisitatiónsprotokol, saman við ráðgeva, j. nr. 2013-0562/8.

Innkomnu tilboðini vóru hesi:

1. Kloakkútlát á Hvítanesi:

| | | |
|---|---|---|
| **Sp/f Maskingrevstur** | **kr.** | **634.182** |
| Sp/f Plan | kr. | 1.938.640 |
| Jakobsen & Hansen | | onki boð |
| Andrias Berg | kr. | 637.650 |
| Articon | kr. | 1.563.272 |
| J & K Petersen | kr. | 1.407.100 |
| Meting | kr. | 670.000 |

2. Kloakkútlát Válgaravík Norður

| | | |
|---|---|---|
| Sp/f Maskingrevstur | kr. | 628.175 |
| Sp/f Plan | kr. | 1.355.900 |
| Jakobsen & Hansen | | onki boð |
| **Andrias Berg** | **kr.** | **619.500** |
| Articon | kr. | 1.278.718 |
| J & K Petersen | kr. | 996.600 |
| Meting | kr. | 575.000 |

3. Kloakkútlát Válgaravík Suður

| | | |
|---|---|---|
| Sp/f Maskingrevstur | kr. | 647.900 |
| Sp/f Plan | kr. | 1.260.450 |
| Jakobsen & Hansen | | onki boð |
| **Andrias Berg** | **kr.** | **585.250** |
| Articon | kr. | 1.288.959 |
| J & K Petersen | kr. | 960.500 |
| Meting | kr. | 580.000 |

4. Kloakkútlát Eystfalssker

| | | |
|---|---|---|
| **Sp/f Maskingrevstur** | **kr.** | **714.056** |
| Sp/f Plan | kr. | 1.226.750 |
| Jakobsen & Hansen | | onki boð |

| | | |
|---|---|---|
| Andrias Berg | kr. | 750.550 |
| Articon | kr. | 1.428.800 |
| J & K Petersen | kr. | 1.171.390 |
| Meting | kr. | 770.000 |

Býráðið hevur hin 21. mars 2013 játtað 2,5 mió.kr. til øll arbeiðini. Í tí sambandi var farið undir arbeiðini 1, 2 og 3, sum sambært fíggjarligu uppgerð, j. nr. 2013-0562/13, 2013-0562/14 og 2013-0562/15 samanlagt var innanfyri játtaðu fíggingina. Vegna væntandi fígging var ikki farið undir arbeiði nr. 4.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Nú tað fyriliggur tøkur framfluttur íløgukarmur innan §6, kto 6875 kloakkir, er rúm fyri at fara undir arbeiði nr. 4: Kloakkútlát Eystfallsker eisini.
Sambært fíggjarligari uppgerð, j. nr. 2013-0562/26, verður samlaði íløgutørvurin fyri arbeiði nr. 4: Kloakkútlát Eystfallsker uml. 1,1 mió. kr. (íroknað mvg, og aðrar útreiðslur).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av lægsta tilboðnum uppá arbeiðstøku nr. 4, og at játta kr. 1,1 mió. av framfluttum íløgukarmi 6875-L00002 , til kto. 6875, L68014, og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 9. oktober 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Einmælt samtykt.

**202/13** **2012-0026 MSH**

**Kloakkútlop við Rættargøtu á Argjum**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Av tí at kloakkin, sum rennur frá reinsiverkinum við Rættargøtu á Argjum, og leiðingin frá Norðasta Horni, liggur rættiliga tætt við Sandagerð, sum er eitt stað ið nógv verður nýtt sum frítíðarstað og sum grindavág, verður neyðugt at leingja kloakklopið út á fjørðin uml. 50 m.

**Fíggjarlig viðurskifti:**

Biðið verður um kr. 200.000 av játtanini fyri íløgur í 2012 til projektering og útbjóðing, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión. Víst verður annars til skjal 2012-0026/1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á plan- og rakstrardeildin mæla til at játta kr. 200.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012 til projektering og útbjóðing at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 12. januar 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, at leggja fyri býráðið, um fíggjarnevndina.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 200.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012 til projektering og útbjóðing.

**Býráðið 26. januar 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Lisitatión var hildin hildin 12. juni 2012 kl. 14.00. Umsitingin hevur latið gera lisitatiónsprotokol, saman við ráðgeva, j. nr. 2012-0026/5.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Sambært fíggjarligu uppgerð, j. nr, 2012-0026/6. verður samlaði fíggjartørvurin fyri projektinum kr. 591.728,-. Býráðið hevur 26. januar 2012 játtað kr. 200.000,- til projektering og útbjóðing. Sostatat er fíggjartørvurin kr. 391.728,-.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta 0,4 mió. kr. av íløgum fyri kloakkir í 2012, §6, 6875 og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 25. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Sum kunnugt var lisitatión var hildin 12. juni 2012, kl. 14.00, og var úrslitið fylgjandi:

| **Arbeiðstakari** | **Tilboðsupphæd (u/mvg)** | **Alternativt tilboð (u/mvg)** | **Fyrivarni** |
|---|---|---|---|
| Robbie Brockie | onki boð | | |
| Plan v/Jóannes Hellisdal | kr. 597.800 | | |
| Maskingrevstur v/Frank Hellisdal | kr. 291.900 | | |
| Andrias Berg | onki boð | | |
| Maskinkoyring v/Karl Patursson | avboð/onki boð | | |
| Articon | kr. 875.030 | | |
| J&K. Petersen | kr. 979.994 | | |

Metingin var kr. 490.000,- (u/mvg).

Farið var undir at gera sáttmála við sp/f Maskingrevstur, men í sambandi við liðuggerð av kloakkarbeiðinum var staðfest, at leiðingin við Rættargøtu var ikki sum upplýst, og kundi arbeiðið tí ikki gerast liðugt. Ráðgevarin saman við TK er komnir til ta niðurstøðu, at broyta uppá prosjektið og hevur hetta ein meirkostnað. Umsitingin hevur í hesum sambandi móttikið ískoytistilboð frá sp/f Maskingrevstur, álj. kr. 218.040,- (víst verður til j. nr. 2012-0026/17).

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaða arbeiðið kemur at kosta uml kr. 0,4 mio. afturat áður játtaðari upphædd álj 0,4 mió. kr. sambært býráðssamtykt 28. Juni 2012. Víst veðrur til skjal nr. 2012-0026/18. Samlaði kostnaðurin fyri hetta arbeiðið gerst sostatt uml. 0,8 mió. kr.

Nú tað fyriliggur tøkur framfluttur íløgukarmur innan §6, kto 6875 kloakkir, er rúm fyri at fara undir framhald av arbeiðinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at takað av ískoytistilboðnum frá Maskingrevstur, og at játta kr. 0,4 mió. av framfluttum íløgukarmi 6875-L00002, til kto. 6875, L68011, og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 9. oktober 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Einmælt samtykt.

**203/13** **2009-2838 MJA**

**Býarskipanardeildin. Miðbýarætlanir**

**Lýsing og samandráttur av málinum:**
fyri vegir, torg og pláss í miðbýnum í Tórshavn. Uppskotini eru gjørd í sambandi við ítøkiligar ætlanir sum til dømis skipan av ferðslu í miðbýnum, Býarskipanardeildin hevur seinasta árini gjørt fleiri uppskot til verkætlanir broyting av byggisamtykt fyri Dr.Jacobsensgøtu, umvæling av Reinsarínum, skipan av ferðslu og parkering á Kongabrúnni v.m.
Uppskotini eru nú samlað saman og verður við hesum lagt fram sum myndatalvir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 9. november 2009:** Býararkitekturin kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
Í sambandi við íløguætlanina fyri 2013 eru avsettar kr. 2 mió. til miðbýarætlan. Formansskapur býráðsins hevur umrøtt málið og ynskir at gongd nú verður sett á fyrireikingararbeiðið. Í hesum sambandi ynskir formansskapurin at biðja um kr. 500.000 til at gera skitsuuppskot og kostnaðarmeting fyri økið kring Mylnugøtu við støði í øðrum hugskotum, sum kommunan hevur arbeitt við fyri hetta økið eins og hugskotum frá privatum borgarum.

**Tilmæli:**
Formansskapurin mælir til at játta kr. 500.000 av kto 6275, til at seta ráðgeva at gera skitsuuppskot og kostnaðarmeting at leggja fyri nevnd og býráð, sambært omanfyri standandi, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 15. mai 2013:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Helena D. á Neystabø, Halla Samuelsen og Jógvan Arge, samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Bogi Andreasen, mælir frá at játta kr. 500.000 og at seta ráðgeva, fyrr enn býráðið hevur umrøtt málið.

**Ískoyti:**
Víst verður til notat í málinum, dagfest 28. mai 2013, har víst er á, at fyri at koma víðari við málinum at arbeiða við loysnum fyri viðurskiftini í miðbýnum, er neyðugt at viðgera miðbýin bæði sum eina heild og harumframt at gera neyvari uppskot til loysnir á teimum einstøku økjunum, har tað tænir endamálinum at fáa ein vælvirkandi miðbý.

Somuleiðis verður í nevnda notati víst á, at tað er eisini ein avgerðandi fortreyt, at ein slík ætlan fær eina høga politiska og fíggjarliga raðfesting.

**Tilmæli:**
Á omanfyri standandi grundarlagi, mæla kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin og tekniski stjórin til fylgjandi handlingsætlan:

1. At seta ein politiskt/fyrisitingarligan stýrisbólk at hava yvirskipaðu ábyrgdina av ætlanini.
2. At seta ein fyrisitingarligan/fakligan arbeiðsbólk at standa fyri arbeiðinum.
3. At bjóða arkitektum til eina work-shop í ein ella tveir dagar at viðgera miðbýarproblematikkin og at koma við hugskotum til, hvat ein miðbýarætlan skal innihalda.
4. At velja út hvørji innsatsøkini skulu vera, og at gera eina raðfylgju nær tey ymsu økini skulu gerast.
5. At bjóða vinnurekandi og øðrum áhugaðum til eina "miðbýar-workshop" at greiða frá pkt. 3 og 4 og at koma viðmerkingum og ynskjum.
6. At fyrireika og útskriva eina hugskotskapping millum arkitektarnar, sum bæði skal fevna um eina heildarætlan fyri miðbýarøkið, og neyvari hugskot fyri tey valdu innsatsøkini og í hesum sambandi at játta kr. 1 mió til fyrireiking av kappingartilfari og samsýningar av avsetta peninginum á fíggjarætlanini fyri 2013 á konto 6275.
7. Beinanvegin eftir lokna hugskotskapping, at gera eina fyribils kostnaðarmeting og raðfesting á langtíðar íløguætlan kommununar samsvarandi teirri í pkt. 4 nevndu raðfesting.
8. Somuleiðis stutt eftir lokna hugskotskapping, at gera projekteringssáttmálar fyri vinnandi loysnirnar um at gera fullfíggjað prosjektir at leggja til grund fyri myndugleikagóðkenningum og útbjóðing av arbeiðum.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Hin 11. og 12. september 2013 var verkstova sambært omanfyri standandi pkt. 3 hildin á Østøm, við luttøku av føroyskum arkitektum, býráðslimum og Býarskipanardeildini.

Fleiri gestir uttanífrá høvdu innlegg um ymisk viðkomandi viðurskifti fyri eina framtíðar miðbýarætlan fyri Tórshavn.

Umsitingin hevur gjørt frágreiðing frá verkstovuni, sum verðurløgd fram á nevndarfundinum og send býráðslimum og luttakarum.

Ein kanning varð gjørd millum luttakararnar á verkstovuni, fyri at fáa eina ábending um, hvat hesir mettu verða mest átrokandi at fáa loyst í miðbýnum. Flest luttakarar vístu á Steinatún og Vaglið.

Luttakandi arkitektar reistu eisini spurningin, um tað ikki var skilabest at býta hugskotskappingina upp soleiðis, at tað fyrst verður ein hugskotskapping um eina yvirskipaða heildarætlan fyri miðbýin, og síðani ein beinleiðis prosjektkapping um tey raðfestu innsatsøkini.

**Tilmæli:**
Til tess at koma víðari í tilgongdini við at gera eina miðbýarætlan, mælir tekniski stjórin til:

1. At býráðið velur ein politiskt/fyrisitingarligan stýrisbólk at hava yvirskipaðu ábyrgdina av ætlanini, sambært pkt. 1 í býráðssamtyktini frá 30. mai 2013.

2. At stjórnin setir ein fyrisitingarligan/fakligan arbeiðsbólk at standa fyri arbeiðinum, sambært pkt. 2 í býráðssamtyktini frá 30. mai 2013.

3. At fyrisitingarligi/fakligi arbeiðsbólkurin fer undir at gera kappingarskrá til hugskotskappingina um eina heildarætlan.

4. At býráðið tekur avgerð um í minsta lagið tvey tey fyrstu innsatsøkini, og at fyrisitingarligi/fakligi arbeiðsbólkurin fer undir at gera kappingarskrá til prosjektkapping fyri tað fyrsta ella bæði fyrstvaldu innsatsøkini.

5. At borgarar í kommununi og onnur fáa møguleika at koma við hugskotum, viðmerkingum, ynskjum o.a. á einum serligum stað, gjøgnum heimasíðu kommununar.

6. At bjóða Nám X í kommununi til eina serliga, avmarkaða kapping um hugskot, sum hava serlig atlit til ynskir og tørv hjá ungum borgarum, og at veita trimum teimum bestu uppskotunum virðislønir á ávikavist kr. 15.000 til 1. virðisløn, kr. 10.000 til 2. virðisløn og kr. 5.000 til 3. virðisløn, og at hesi uppskot kunnu verða partur av kappingarskránni fyri eftirfylgjandi hugskotskappingina og prosjektkappingina millum arkitektar.

**Tekniska nevnd 9. oktober 2013:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Einmælt samtykt at velja formansskapin í stýrisbólkin og at broyta punkt 6 soleiðis, at allur skúlaungdómur kann luttaka og ikki einans Nám X.

**204/13** **2012-0610**

**Havastova til Ellisheimið**

Í íløgufíggjarælanini fyri 2012 eru settar 1 mió kr. av til Ellisheimið. Ætlanin við hesi játtan er at byggja havastovu út frá stovuni móti Debesartrøð.

Gerast skal byggiprosjekt og neyðug loyvi fáast til vega. Mett verður skilabest, at hesar fyrireikingar verða gjørdar samstundis og av sama ráðgeva sum ætlaða útbyggingin av goymslu v.m. til køkin á hinaru síðuni.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at játta 1 mió kr. av kontu 2775 Eldrarøkt (løgujáttan) til at gera havastovu til Ellisheimið.

**Sosiala nevnd 13. mars 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Samtykt at taka undir við sosialu nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðið 29. mars 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í skrivi dagf. 14. september 2012 vísir leiðarin á Ellis- og umlættingarheiminum og Heiminum á Vallalíð á sera væleydnaðu verkætlanina við fýra heimabúgvandi minnisveikum, ið hava hug og førleikar til at arbeiða við tí, sum hoyrir jarðarbrúki til. Almannaverkið hevur fíggjað lønir og Tórshavnar kommuna amboð, tilfar v.m. Heimið søkir nú Almannaverkið um at fáa hetta dagtilboð umlagt til eina fasta skipan og víðkað, so at 5- 6 fólk kunnu fáa ágóðan av tilboðnum.

Fyri at dagtilboðið skal virkað eftir ætlanini er tó neyðugt, at karmarnir verða rúmsáttari, so at bæði starvsfólk og "arbeiðsfólk" (tey minnisveiku) í dagtilboðnum fáa sítt egna rúm at fara inn í, hava amboð í, o.s.fr. Leiðarin vísir í hesum sambandi á, at møguleikar fyri einum sovorðnum rúmi eru góðir á Vallalíð. Úti í havanum er ein stór terassa, sum lættliga kundi verið umbygd til eitt slíkt uppihaldsrúm saman við einum drívhúsi. Eitt drívhús – sum øll tey, ið búleikast á Vallalíð, eisini høvdu fingið stóra gleði av, og sum hevði víðka um møguleikar fyri virksemi, eisini tá veðrið ikki er til vildar.

Leyslig kostnaðarmetingin fyri hesa bygging er uml. kr. 400.000, og tá er roknað við, at ein partur av byggingini verður gjørd av húsavørðinum saman við teimum minnisveiku í dagtilboðnum. Leiðarin vísir á, at arbeiðið kann fíggjast við at taka av játtanini, sum ætlað er til havastovu á Ellisheiminum L27005, treytað av, at hetta kemur á aftur.

Uppskotið um uppihaldsrúm og drívhús er sera viðkomandi fyri tað slóðbrótandi arbeiðið, ið Vallalíð hevur við teim heimabúgvandi minnisveiku, sum enn eru kropsliga

væl fyri. Sambært fyribils og varnari kostnaðarmeting verður havastovan til Ellisheimið, sum er at líkna við upphitaða upphaldsrúmið í Naina, at kosta uml. kr. 1,2 mió. Arbeiðið er meira krevjandi enn fyrst hildið, eitt nú skal ein nýggj berandi konstruktión gerast. Neyðugt verður tí við støðutakan til metta fíggjartørvin, áðrenn víðari fyrireikingararbeiði kann setast í gongd.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at játta kr. 400.000, sum áður eru játtaðar til havastovu á Ellisheiminum konta 2775 Eldrarøkt L27005, til uppihaldsrúm og drívhús á Vallalíð.

**Sosiala nevnd 9. oktober 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Býráðið hevur í sambandi við keypið av BankNordik samtykt umraðfestingar av íløgum í 2013, herundir avlop á ávísum verkætlanum.

Uppruna endamálið við hesi játtanini kr. 1.000.000 kontu 2775 L27005 Havastova til Ellisheimið er, sum málslýsingin omanfyri vísir, merira krevajandi enn fyrst hildið. Brúktar eru kr. 7.000 til ymsar fyrireikingar. Avlopið á kontuni er sostatt 993.000.

Sosiala nevnd hevur seinni samtykt at játta fígging til uppihaldsrúm v.m. til dagtilhaldið fyri yngri dement á Vallalíð, men samtyktin er ikki formliga samtykt í figgjarnevnd ella býráð, og hevur tí ikki gildi. Heimið í Vallalíð hevur fingið til vega skitsu og kostnaðarmeting kr. 645.000 fyri ikki liðugt bygt hús.

Mett verður, at skal arbeiðast víðari við hesi ætlan í Vallalíð, eigur nýggj játtan at verða fingið til vega.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at loka málið og flyta avlopið kr. 993.000 til kontu 6175 L61002 keyp av bygningum frá BankNordik.

**Trivnaðarnevndin 21. oktober 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2013:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Einmælt samtykt.

**205/13** **<u>2003-1149 HH</u>**

**<u>Áheitan frá Katrinu í Geil, dagfest 22. mai 2003, um strikan av servituttum á matr. nr. 1 fk, Hoyvík</u>.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Stykkið var í síni tíð latið pápa umsøkjarans í sambandi við ognartøku av matr. nr. 693b til skúlabygging.

Talan er um hesar servituttir í skeytinum:

4. Innan 20 ár frá tí, at endaligt skeyti er tinglýst, skulu sethús vera bygd á stykkinum, annars fellur stykkið aftur til seljarans móti, at keyparin fær keypspeningin og tað, hann hevur goldið fyri byggibúning, afturgoldið uttan rentu. Fellur stykkið aftur av hesi orsøk, og keyparin hevur byrjað bygging, kann hann fáa prógvarðar útreiðslur endurgoldnar í tann mun, tað gjørda arbeiðið kemur seljaranum ella øðrum keypara av sama stykki til góðar.

5. Keyparin hevur ikki loyvi til at selja ella lata stykkið víðari uttan til lívsarvingar, fyrr enn sethús eru bygd á stykkinum.

**Fíggjarnevndin 21. august 2003:** Samtykt at leingja tíðarfreistina til 1. januar 2007 fyri bygging.

**Býráðið fyri læstum hurðum 28. august 2003:** Málið beint aftur í fíggjarnevndina, tí nýggir upplýsingar eru í málinum.

**Uppískoyti:**
Nýggj skriv frá umsøkjaranum, dagfest 28. august 2003 og 9. september 2003, har hon grundar sína umsókn við,

at matr. nr. 1fk er ein partur av einum makaskifti
at aðrir borgarar í kommununi hava fingið hesar sømdir, og
at í dag verða hesir servituttir ikki nýttir í sambandi við makaskifti

**Fíggjarnevndin 18. september 2003:** Samtykt at mæla býráðnum til at strika servituttin fyri bygging innan 20 ár.

**Býráðið fyri læstum hurðum 25. september 2003:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**<u>Uppískoyti.</u>**
Katrina í Geil heitir enn einaferð á kommununa, 13.mMai 2013, at strika servituttin nr. 5 sum ásetur:

5. *Keyparin hevur ikki loyvi til at selja ella lata stykkið víðari uttan til lívsarvingar, fyrr enn sethús eru bygd á stykkinum.*

Katrina í Geil ger vart við, at gamla skeytið í sambandi við makaskifti hevði ongar bindingar.

Kommunan hevur í 2003 samtykt at avlýsa treytirnar um byggifreist ( nr. 4), men ikki um lívsarvingar (nr. 5). Tað framgongur ikki av viðgerini frá 25. september 2003, hví bert nr. 4 bleiv strikað.

Matr.nr 1fk, Hoyvík, er ein partur av makaskifti, gamla skeytið hevði ongar bindingar.

Ì dag verður hesin servituttur ikki nýttur í sambandi við tá kommunan makaskiftir og heldur ikki í sambandi við treytir um bygging í vanligu skeytum kommununnar.

Ognin er avhendað til ein lívsarving, sum er umsøkjarin, uttan bygging er framd á nevnda matr.nr.

Tað framgongur ikki neyvt av servituttinum, nr. 5, at áleggingin um bygging skal fylgja lívsarvingunum.

Mett verður, at endamálið við nr. 5 er burtur, tá nr. 4 er strikaður. Nevnliga samb. grein 5 er eingin byggifreist yvirhøvur.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at beina málið í teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at taka undir við áheitanini at strika servituttin og beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvissdeildini mæla til at strika servituttin. Samstundis verður mælt til, at fíggjarnevndin kannar, um til ber at seta sum treyt fyri at strika servittutin, at grundøkið skal verða til bygging av sethúsi sambært upprunaligu útstykkingarætlanini fyri økið, og ikki kann leggjast saman við øðrum matrikli.

**Tekniska nevnd 24. oktober 2013:** Vísandi til meting hjá løgdeildini, j. nr. 2003-1149/19, samtykti nevndin at mæla til at strika servituttin og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Einmælt samtykt.

**206/13** **2011-1538 EYE**

**Eyðbjørn Gaard: Áheitan vegna Eigarafelagið undir Borgarhálsi um fund og greiða frá allari verkætlanini um vegagerðina undir Borgarhálsi á Velbastað.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin hevur á fundum við umboð fyri eigarafelagið undir Borgarhálsi viðgjørt áheitan teirra um at dagføra vegin undir Borgarhálsi.

Víst varð á, at kommunan ikki hevur sett pening av til liðuggerð av øllum útstykkingarvegnum, soleiðis at liðuggerðin kann gerast í einum. Stórur partur av vegnum manglar slitlag og kansteinar, og áðrenn hetta arbeiðið kann gerast, skulu neyðugar regnvatnsleiðingar regulerast. Sama er galdandi fyri vegaprofil, tí atlit skulu takast fyri verandi tún og íbindingar.

Tað fyriliggur eingin kostnaðarmeting fyri liðuggerðina, men leysliga mett kemur arbeiðið at kosta umleið 3 til 4 mió. kr. og at málið skal staðfestast um teknisku nevnd, fíggjarnevnd og býráð.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstardeildini mæla nevndini til at taka støðu til, um farast skal undir at gera eitt skitsu uppskot við kostnaðarmeting, fíggjað av íløgum fyri 2012 §6 8175 'Vegakervið Dvørgastígur/undir Borgarhálsi', at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 8. november 2011:** Nevndin samtykti at gera eitt skitsu uppskot við kostnaðarmeting av at gera vegin undir Borgarhálsi lidnan, fíggjað av íløgum fyri 2012 §6 8175 'Vegakervið Dvørgastígur/undir Borgarhálsi'.

**Ískoyti:**
Biðið verður um kr. 300.000,- at gera skitsu uppskot við kostnaðarmeting, fíggjað av íløgum fyri 2012 §6 8175 'Vegakervið Dvørgastígur/undir Borgarhálsi', har avsettar eru kr. 2.mill fyri 2012.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at beina málið aftur í teknisku nevnd at útgreina og lýsa nærri.

**Ískoyti:**
Vísandi til at nevndarlimir í fíggjarnevndini hava beint málið aftur í teknisku nevnd, skal verður víst á, at ætlaða upphæddin skal nýtast til at gera eitt skitsu uppskot við kostnaðarmeting. Sjálvur vegurin er uml. 500 m, og fyri at fáa vegin gjørdan lidnan, skal peningur setast av til slitlag og kantsteinar. Neyðugar regnvatnsleiðingar skulu eisini regulerast. Sama er galdandi fyri vegaprofil, tí atlit skulu takast fyri verandi tún og íbindingar. Talan er um veg, sum er gjørdur av Kirkjubø/Velbaðstaðar kommunu undan samanleggingini við Tórshavn, men sum ongantíð er gjørdur liðugur.

**Tekniska nevnd 14. februar 2012:** Vísandi til omanfyristandandin lýsing og til samtykt frá 8. november 2011, verður mælt til at játta kr. 300.000 til skitsuprosjektering við kostnaðarmeting. Málið verður beint aftur í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 23. februar 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Staðbundnu limirnir biðja um status við vegagerðini undir Borgarhálsi.

**Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 12. mars 2012:** Býarverkfrøðingurin greiddi frá málinum. Málið verður lagt fyri teknisku nevnd 19. apríl ella 22. mai 2012.

**Ískoyti:**
Skitsuuppskot við kostnaðarmeting verður framlagt á fundinum. Sambært fyribils metingum kemur dagføringin av vegnum at kosta kr. 2.250.000,-.
Tekniska nevndin skal taka støðu til, hvussu dagføringin av vegnum skal fíggjast.

**Tekniska nevnd 19. apríl 2012:** Nevndin samtykti at játta 1,7 mió. kr., fíggjað av íløgum fyri 2012, §6 8175 Dvørgastígur/undir Borgarhálsi' og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.  Eisini samtykt at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Borgarstjórin tók málið av skrá, tí fígging fyriliggur ikki í nóg stóran mun til verkætlanina, og er sostatt ikki klárt at bjóða arbeiðið út.

**Fíggjarnevndin 2. mai 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta 1,7 mió. kr., fíggjað av íløgum fyri 2012, §6 8175 Dvørgastígur/undir Borgarhálsi. Eisini samtykt at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión.

Eisini samtykt at arbeiða víðari við at útvega fígging til vegagerðina á Dvørgastígi.

**Býráðið fyri læstum hurðum 2. mai 2012**: Einmælt samtykt.

**Býráðið 2. mai 2012**: Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ráðgevi kommununar, hevur vegna kommununa, sett arbeiðið at dagføra vegin Undir Borgarhálsi í útboð.
Sjey arbeiðstakarar lótu boð inn og  lægsta boð hevði Sp/f Maskinkoyring (sí j. nr. 2010-2519/15).

Fyrisitingin hevur fyri lægsta boð, mett um samlaða kostnaðin fyri arbeiðið, har prosjektering, eftirlit, óvæntað og MVG eru íroknað, (sí j. nr. 2010-2519/16).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til, at nevndin samtykkir, at taka av tilboðnum frá sp/f Maskinkoyring, við støði í teirra tilboði (sí j. nr. 2010-2519/10) og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina, at útvega kr. 700.000,- afturat av kt. 8175 – íløga í vegir, avsett til dagføring av Sundsvegnum (mál nr. 2008-1294).

**Tekniska nevnd 25. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Bjarni Mikkelsen og Eyðbjørn Gaard, hava vegna Eigarafelagi Undir Borgarhálsi vent sær til kommununa við ynski um at stuðlamúrur verður gjørdur fram við hansara grundøki, matr. nr. 50s, Velbastaður (sí eisini j. nr. 2010-2519/18 og 25).
Ført verður fram, at Bjarni Mikkelsen ynskir somu sømdir sum grannin sunnanfyri á matr. nr. 50u, hóast hann ikki hevur grivið seg inn undir vegin, áðrenn vegarbeiðið varð byrjað.

Ráðgevi kommununar hevur, í sambandi við prosjekteringina av vegnum, mett tað nøktandi, at kantsteinur verður settur fram við matr. nr. 50s, og at skrái verður frá kantsteininum og niður í túnið inn ímóti bilhúsinum hjá Bjarna Mikkelsen á matr. nr. 50s.

Ráðgevi kommununar hevur, vegna kommununa, spurt seg fyri hjá arbeiðstakaranum um kostnað fyri at gera stuðlamúr fram við matr. nr. 50s.
Arbeiðstakarin sigur seg kunna gera stuðlamúrin fyri kr. 8.600,- fyri rúmmeturin av betongi og mett verður, at teir 16,6 metrarnir av stuðlamúri kunnu gerast fyri umleið kr. 48.540,-, umframt MVG. Afturat hesum koma útreiðslur til umprojektering, eftirlit o.l. Arbeiðið er eisini um at verða liðugt.

Matrikulánarin á matr. nr. 50f hevur sjálvur latið gera stuðlamúr framvið hjá sær og hevur eingi krøv sett fram móti kommununi í hesum sambandi.

Eingin av eftirverandi matrikulánarunum niðan fyri vegin, matr. nr. 50v, 50r, 50q, hava set fram ynski um at stuðlamúrur verður gjørdur framvið hjá teimum.

Umsitingin kemur saman við ráðgeva at greiða frá arbeiðinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til, at svara eigarafelagnum, at arbeiðið er gjørt sambært góðkenda prosjektinum.

**Tekniska nevnd 22. november 2012:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Maria Hammer Olsen, Sjúrður Olsen og Jákup Símun Simonsen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til at tosa við Bjarna Mikkelsen um eina loysn.

**Ískoyti:**
Tá fari var undir at dagføra innara part av vegnum undir Borgarhálsi, var ferðslutrygdin á vegnum munandi bøtt við gongubreyt framvið vestara vegjaðara og kantsteinum framvið eystara vegjaðara, har tað frammanundan bert var smøl vegøksl og høgt omanav.
Tá arbeiðið byrjaði, vóru tríggjar vegbungur burturtiknar og nú dagføringin av vegnum er um at vera liðug, eigur støða at vera tikin til hvørt ferðslubungur aftur skulu setast á vegin.

Av tí at nógv ferðsla er á vegnum, eisini í samband við frískúlan, ofta við skundi og vegurin er beinur og breiður  (6 m koyribreyt), eigur vegurin at verða ásettur at vera 30 km/t zona og minst ein av ferðtálmandi vegbungunum at verða afturgjørdar.

Umsiting kommununar hevur gjørt uppskot til reetablering av tí einu vegbunguni í 11 m breidd útfyri, undir Borgarhálsi 30 (sí j. nr. 2010-2519/41 og j. nr. 2010-2519/35).

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at vegurin undir Borgarhálsi verður ásettur at vera 30 km/t zona og at vegbunga verður gjørd útfyri undir Borgarhálsi 30, samsvarandi uppskotinum frá umsitingini, tó so at vegbungan verður gjørd til 30 km/t ferðslutálming.

**Ferðslunevndin 15. januar 2013:** Ferðslunevndin tekur undir við tilmælinum, og beinir málið í teknisku nevnd til støðutakan.

**Ískoyti:**
Sp/f Maskinkoyring hevur tann 11. mars 2013, handað kommununi gjørda arbeiðið, at dagføra vegin undir Borgarhálsi, fullfíggjað uttan manglar av nøkrum slag. Trygdin hjá arbeiðstakaranum stendur tó við fram til 1. ára garantisýn tann 11. mars 2014.

Fyrisiting kommununar hevur uppgjørt arbeiðið fíggjarliga pr. 19. august 2013 (sí j. nr. 2010-2519/53) og vísir henda, at samlaða arbeiðið hevur kosta kr. 2.393.436,89, tá prosjektering, eftirlit, MVG v.m. er íroknað og sum er avlop  á kr. 306.563,12 í mun til uphæddina á kr. 2.700.000,-, sum býráðið hevur játtað til arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at avlopið á kr. 306.563,12 verður sambært galdandi játtanarreglum um avlop av lidnum verkætlanum - grein 3, flutt frá verkætlanini undir Borgarhálsi, til at verða tøkt til ætlaðar íløgur í vegir kto. 8175 í 2013 og at verkætlanin undir Borgarhálsi verður lokað.

**Tekniska nevnd 24. oktober 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.
Helena D. á Neystabø og Marin Katrina Frýdal luttóku ikki í viðgerðini.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og flyta avlopið frá verkætlanini undir Borgarhálsi, til at verða tøkt til ætlaðar íløgur í vegir kto. 8175 í 2013 og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Einmælt samtykt.

**207/13** **<u>2012-1353 (sí eisini má nr. 2007-2796) EY</u>**

**<u>Býlingavegur millum Blómubrekku og Villingardalsvegin – 1. stig</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í framhaldi av máli nr. 2007-2796, fevnir hetta málið um sjálva vegagerðina av vegi millum útstykkingina hjá sp/f Bjarni Poulsen og Blómubrekku.

Talan er um vegagerð sambært skjali nr. 2007-2796/35, sum verður framlagt til støðutakan.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Fyri at fara undir vegagerðina er neyðugt at játta fígging, sum sambært fyribilsmetingum er mett til at verða uml. 2,1 mió. kr. smb. skjali j. nr. 2012-1353/4. Fíggjartørvur álj. 2,1 mió. verða at útvega sum eykajáttan sambært skjali j. nr. 2012-1353/5.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at:
1. taka undir við skitsu uppskotinum skjali nr. 2007-2796/35.
2. beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina, at fíggja upphædd álj. kr. 2,1 mió. av kt. 8175 – íløga í vegir, avsett til Glyvursveg við brúgv (mál nr. 2006-3283).
3. heimila umsitingini at fara undir at bjóða arbeiðið út sum inboðin lisitatión at leggja fyri teknisku nevnd aftur.

**Tekniska nevnd 25. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ráðgevi hevur, vegna kommununa, boðið arbeiði, at gera vegin, út til fimm arbeiðstakarar.

Tilboðini vóru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| Andreas Berg Sp/f | 1.991.820 kr. (uttan MVG) |
| Articon P/F | 1.343.380 kr. (uttan MVG) |
| J & K Petersen P/F | 1.996.369 kr. (uttan MVG) |
| Plan Sp/f | 2.144.547 kr. (uttan MVG) |
| R.J. Brockie Sp/f | 1.529.685 kr. (uttan MVG) |

Ráðgevin hevur eftirkannað tilboðini, og mælir til at taka av lægsta tilboðnum. Umsitingin hevur gjørt samlaða kostnaðarmeting, íroknað projektering, eftirlit, ókent, prosjektumsiting, mvg v.m., og metir at samlaði kostnaðurin kann haldast innfyri játtaða fíggjarkarmin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til, at nevndin heimilar umsitingini, at taka upp samráðingar og gera sáttmála við Articon P/F, ið hevði lægsta boð, um gerð av arbeiðinum, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 4. september 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt.

Arbeiðstakarin hevur boðað frá, at hann ikki tekur undir við ásetingunum í uppskotinum til sáttmála um raðfylgjuna av skjølum, sum hann ikki metir verða sambært avtalu millum Handverksmeistarafelagið og Byggiharrasamtakið. Umsitingin hevur kannað hetta, og hevur frá Byggiharrasamtakinum fingið váttan um, at Byggiharrasamtakið hevur ikki bundið seg til skjalaraðfylgjuna sum arbeiðstakarin sigur, men metir skjalaraðfylgjuna at verða ein samráðingarspurningur. Tað tykist tískil sum at Handverksmeistarafelagið og Byggiharrasamtakið hava ymiskar tulkingar av, hvat teir hava avtalað. Av tí at hetta er ein týðandi, prinsippiellur spurningur, sum kann hava stóran løgfrøðiligan týdning í sambandi við eina sáttmálatrætu, hevur Byggiharrasamtakið skrivliga biðið Handverksmeistarafelagið um fund um hetta. Leggjast kann afturat, at kommunan hevur gjørt fleiri sáttmálar seinastu árini, uttan at spurningurin um skjalaraðfylgju hevur verið ein forðing.

**Tilmæli:**
Av tí at semja ikki fæst við lægsta tilboðsgevaran, og at umsitingin metir, at arbeiðið ikki eigur at bíða meira, verður mælt til at venda sær til tilboðsgevaran við næstlægsta

tilboðnum við fyrispurningi um hann stendur við tilboð sítt á kr. 1.529.685 u. mvg, sum er kr. 186.300 hægri enn lægsta tilboðið. Og um so er, at heimila umsitingini at taka upp samráðingar og gera sáttmála við Sp/f R.J. Brockie.

**Tekniska nevnd 6. februar 2013:** Útsett.
**Ískoyti:**
Samráðingar við lægsta tilboðsgevaran vóru tiknar upp, og er sáttmáli nú gjørdur.

Arbeiðið byrjar í mars 2013.

**Tekniska nevnd 18. mars 2013:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
P/f Articon hevur tann 29. mai 2013, handað kommununi gjørda arbeiðið, í sambandi við nýgerð av fyrsta parti av býlingavegnum millum Blómubrekku og Villingadalsvegin.
Fyrisiting kommununar hevur uppgjørt arbeiðið fíggjarliga pr. 15. august 2013 (sí j. nr. 2012-1353/52) og vísir henda, at samlaða arbeiðið hevur kosta kr. 1.352.395,79, tá serstakt fíggjarligt íkast, prosjektering, eftirlit, MVG v.m. er íroknað og sum tí gevur eitt avlop á kr. 747.604,21, í mun til uphæddina á kr. 2.100.000,-, sum býráðið hevur játta til arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at avlopsupphæddin á kr. 747.604,21 verður sambært galdandi játtanarreglum um avlop av lidnum verkætlanum - grein 3, flutt frá verkætlanini at gera 1. stig av býlingavegnum til at verða tøkt til ætlaðar íløgur í vegir kto. 8175 í 2013. Verkætlanin við 1. stigi av býlingavegnum verður lokað.

**Tekniska nevnd 24. oktober 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

Helena D. á Neystabø og Marin Katrina Frýdal luttóku ikki í viðgerðini.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og flyta avlopið frá verkætlanini at gera 1. stig av býlingavegnum til at verða tøkt til ætlaðar íløgur í vegir kto. 8175 í 2013 og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Einmælt samtykt.

**208/13** **2008-3134 EY**

**Høvuðsprojekt-Nevndarviðgerð: Rundkoyringin Sundsvegur – Blómubrekka - Óluvugøta**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Víst verður til mál j.nr. 2005-2344: Dispositiónsuppskot: Rundkoyring Sundsvegur – Blómubrekka – Óluvugøta.

Dispositiónsuppskotið hevur verið til "Ferðslutrygdargrannskoðan" hjá Viatrafik, sí j. nr. 2008-3124/1.
Somuleiðis hevur Viatrafik gjørt eitt projektuppskot við koyrikurvum, sí j. nr. 2008-3125/1. Projektuppskotið er broytt nakað í mun til dispositiónsuppskotið.

Umsitingin hevur gjørt ráðgevingaravtalu við LBF P/f um projektering og eftirlit viðvíkjandi rundkoyringini. Víst verður til j. nr. 2008-3127/1.

Ráðgevingarfyritøkan LBF P/f hevur gjørt høvuðsprojekt, sí j. Nr. 2008-3132/1, grundað á projektuppskotið frá Viatrafik.

Rundkoyringin hevur ein diametur upp á 37 m við 3 m gongu- og súkklubreyt.

Atlit eru tikin til estetik, og at møguleiki verður at planta vøkstur í skráarnar. Eisini verður grótgarður laðaður, har tað er neyðugt.

**Fíggjarviðurskiftir:**
LBF P/f hevur gjørt eina kostnaðarmeting av arbeiðnum, sí j. nr. 2008-3133/1.

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting íroknað projektering og eftirlit, umsiting, óvæntaðar útreiðslur, reinskan av vegvatni og 6,25% mvg, sí j. nr. 2008-3133/2.

**Tekniska nevnd skal taka støðu til fygljandi:**
1. Endaliga góðkenning av høvuðsprojektinum og kostnaðarmeting
2. Útbjóðingarháttur

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at arbeiða víðari við fyriliggjandi loysn - tó so, at hædd verður tikin fyri framskrivaðum ferðslutrýsti á økinum við støði í frágreiðing frá Rambøl Nyvig frá apíl 2008 um Innkomuvegin til Havnar (sí mál nr. 2001-0407) og annars at projektið tekur hædd fyri verkætlanini viðv. dagføringini av Sundsvegnum (sí mál nr. 2008-1294).

**Tekniska nevnd 12. juni 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Umsitingin hevur heitt á ráðgeva um at gera uppskot til eina tveysporaða rundkoyring. Víst verður til TK j. nr. 2008-3132/2. Tilkoyringarvegurin Sundsvegur er ætlaður til at verða tveysporaður í framtíðini, meðan tilkoyringarvegirnir Blómubrekka og Óluvugøta verða einsporaðir vegir í framtíðini.

**Keyp av lendi:**
Lendisviðurskiftini verða broytt nakað í mun til fyrra uppskotið, og má hesin spurningurin takast upp við eigararnar av matr. nr. 1464a, 1466.

**Fíggjarviðurskifti:**
Umsitingin hevur heitt á ráðgevan LBF P/f um at gera eina kostnaðarmeting av dupultrundkoyringini, sí skjal nr. 2008-3133/3.

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting íroknað projektering og eftirlit, umsiting, óvæntaðar útreiðslur, reinskan av vegvatni og 6,25% mvg, sí j. nr. 2008-3133/4.

**Tekniska nevnd skal taka støðu til fygljandi:**

1. Endaliga góðkenning av høvuðsprojektinum og kostnaðarmeting

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðkenna høvuðsprojektið og kostnaðarmetingina og at málið um útvegan av meira lendi verður beint í fíggjarnevndina til at taka upp samráðingar við lendiseigararnar.

**Tekniska nevnd 18. september 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at umsitingin leggur uppskotið við ítøkiligari kostnaðarmeting fyri nevndina aftur, áðrenn arbeiðið verður boðið út.

**Ískoyti:**
Í sambandi við ætlanum at byggja tónlistarskúla á økinum eystan fyri Norðurlandahúsið og við vegaíbinding til Sundsvegin, skal støða takast til um ikki vegamótið Sundsvegur/Óluvugøta/Blómubrekka skal dagførast við ætlaðu rundkoyringini. Málið um gerð av rundkoyring hongur eisini saman við alsamt væntandi øktari ferðslu í sambandi við atkomuvegin til Havnar. Harumframt kann væntast økt ferðslutrýst í sambandi við íbúðarbygging á økinum millum Blómubrekku og Villingardalsvegin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at nevndin, umvegis fíggjarnevndina og býráðið, raðfestir avseting av 8,6 mió. kr. (smb skjal nr. 2008-3133/2) til at gera útbjóðingartilfar til rundkoyringina at leggja fyri nevndina aftur, og at fremja arbeiðið, á íløguætlanini fyri 2012.

**Tekniska nevnd 25. august 2011:** Málið umrøtt.

Sjúrður Olsen luttók ikki.

**Tekniska nevnd 22. september 2011:** Nevndin samtykti at umsitingin, ísv. við málið um dagføring av Sundsvegnum, j. nr. 2008-1294, kannar ymsar vegaloysnir á vegamótinum Sundsvegur-Óluvugøtu.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt við øðrum vegaloysnum á vegamótinum. Greitt verður frá hvørjari loysn kommunan kundi arbeitt eftir.
Settar eru 2 mió. kr. av til rundkoyring við Óluvugøtu fyri fíggjarárið 2012 (§6 konto 8175).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta kr. 200.000,- av íløgum fyri 2012 (§6, kto. 8175) til projektering av skitsuuppskoti við kostnaðarmeting, at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 1. desember 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at játta kr. 200.000 av íløgum fyri 2012 av konto 8175 til projektering av skitsuuppskot og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitignin hevur saman við ráðgeva latið gera skitsuuppskot við kostnaðarmeting. Greitt verður frá uppskotunum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við skitsu nr. 5, VFS 14.05.2012, sí j. nr. 2008-3134/x-x.

**Tekniska nevnd 22. mai 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskoti, skitsa 3A, VFS 10.05.2012, sí j. nr. 2012-0370/10 og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 300.000,00 av konto 8175, vegir.

**Býráðið 31. mai 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið, at gera rundkoyringina, er boðið út til tveir arbeiðstakarar.

Lisitatión verður áðrenn fundin í teknisku nevnd, og verða tilboðini við tilmæli, løgd fram á fundinum.

Vísandi til at lisitatión er beint eftir at skráin er farin út, kemur tilmæli til fundin.

Tilboðini frá teimum bjóðandi vóru hesi:
P/f J & K Petersens Contr. kr. 522.471,- (uttan mvg)
P/f Articon kr. 668.798,- (uttan mvg)

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Umsitingin hevur latið gera samlaða kostnaðarmeting, íroknað byggiharraveitingar, eftirlit, mvg v.m. Víst verður til innanhýsis skjal nr. 2008-3134/16.

Býráðið hevur áður játtað kr. 200.000 og kr. 300.000 av íløgum fyri 2012, konto 8175-L81006.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at taka av lægra tilboðnum frá P/f J & K Petersens Contr.áljóðandi kr. 522.471,- (uttan mvg).

Mælt verður eisini til at játta kr. 300.000,- til írestandi fígging av verkætlanini sambært innanhýsis skjali nr. 2012-0370/16 av §6 konto 8175 – L81003, Glyvursvegur við brúgv og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 4. september 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
P/f J&K Petersen hevur tann 27. mars 2013, handað kommununi Rundkoyringina á vegamótinum Sundsvegur - Blómubrekka – Óluvugøta.

Fyrisiting kommununar hevur uppgjørt arbeiðið fíggjarliga pr. 23. september 2013 (sí j. nr. 2008-3134/30) og vísir henda, at samlaða arbeiðið hevur kosta kr. 786.189,- prosjektering, eftirlit, MVG v.m. er íroknað og sum tí gevur eitt avlop á kr. 13.811,- í mun til uphæddina á kr. 800.000,- sum býráðið hevur játta til arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at avlopsupphæddin á kr. 13.811,- verður verður sambært galdandi játtanarreglum um avlop av lidnum verkætlanum - grein

3, flutt frá rundkoyrings verkætlanini, til at verða tøkt til ætlaðar íløgur í vegir kto. 8175 í 2013 og at verkætlanin verður lokað.

**Tekniska nevnd 24. oktober 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.
Helena D. á Neystabø og Marin Katrina Frýdal luttóku ikki í viðgerðini.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og flyta avlopið frá rundkoyrings verkætlanini, til at verða tøkt til ætlaðar íløgur í vegir kto. 8175 í 2013 og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Einmælt samtykt.

**209/13** **2006-1053 BJ/BH**

**Alment wc í Kirkjubø**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
**Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 27. november 2006:** Kunnað var um málið.

**Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 21. mai 2007:** Heitt verður á Tórshavnar kommunu um at seta pening av til almenn wc í Kirkjubø og rakstur.

**Ískoyti:**
Staðbundnu limirnir spyrja eftir status í málinum.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 15. oktober 2007:** Tekniski stjórin kunnaði um málið.

Higartil er ikki peningur settur av til verkætlanina. Søkt er um játtan í 2008 til slíkar íløgur.

- Tekniska nevndin skal taka støðu til umbønina frá staðbundnu nevndini.

**Tekniska nevnd 17. januar 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við áheitanini frá staðbundnu nevndini og at gera uppskot til staðseting og søkja avvarðandi myndugleikar um loyvi.

Staðbundnu limirnir spyrja eftir status í málinum.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 5. mars 2008:** Kunnað varð um málið. Arbeitt verður við at fáa neyðug loyvir til vega, men játtan er ikki sett av til hetta arbeiðið í íløgum. Møguliga kann hetta fíggjast um raksturin.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 26. mai 2008:** Heitt verður á Tórshavnar kommunu um at arbeiða við eini loysn.

**Ískoyti:**
Staðbundnu limirnir biðja um status í málinum.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 22. oktober 2008:** Tóri í Hoyvík kunnaði um málið. Málið er hjá Fornminnismyndugleikanum.

**Ískoyti:**
Staðbundnu limirnir ynskja at verða kunnaðir um heildarætlanina frá fornminnismyndugleikanum.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 9. desember 2008:** Svar er ikki komið frá Fornminnismyndugleikunum enn.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur í skrivi frá Føroya Fornminnissavni, dagf. 17.12.2008, fingið upplýst, at sambært áliti um heildarætlan fyri varðveitingini av fornminnum í Kirkubø, verður mælt ikki til at gera viðskiftahús, áðrenn politisk støða er tikin til tilmælið. Umsitingin kunnar annars um gongdina í málinum.

**Tekniska nevnd 14. mai 2009:** Leiðarin á lendisdeildini kunnaði um status í málinum. Nevndin samtykti at beina málið í byggi-og býarskipanarnevndina til endaliga staðseting av viðskiftahúsinum (almennum wc og buss-skýli).

**Ískoyti:**
3 uppskot eru í umboði, viðv. staðseting av viðskiftahúsi (alment wc og bussskýli). Umsitingin mælir til 3 møguleikar á trimum økjum, liggjandi í økinum H. Økið er lagt av til frílendi, úthús líknandi bygning til tænastur, men ikki íbúðarbygning.

Økini liggja á matrikkul nummar 8a (A). Vit mæla ti, at hetta økið er best egnað. Næstbest egnað er 10a (B). Triðja best egnaða økið er 20 C (C). Sí ávikavist niðanfyri, og hjáløgdu tekning:

A.8a Ognarviðurskifti: Búnaðargrunnurin fyrr (Føroya Jarðargrunnur) samb. Dóm 30.09.1999. Sí tekning: Uppskot til viðskiftahús í Kirkjubø, 09.01.1999, J.P. Gregoriussen & U. Patursson

B. 10a Útbygging av kaffistovu. Gjøllari kanningar eru neyðugar

C. 20 c Ognarviðurskifti Tórshavnar kommuna.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at velja uppskot A.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. juni 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í teknisku nevnd.

Kunnað verður um status.

**Tekniska nevnd 3. september 2009:** Kunnað varð um málið.

Formaðurin í teknisku nevnd ynskir at viðgera málið.

**Tekniska nevnd 14. januar 2010:** Nevndin samtykti at heita á borgarstjóran um at taka málið upp við viðkomandi landsstýrisfólk, við støði í skrivi frá Føroya Fornminnissavni (j. nr: 2006-1053/13), vísandi til týdningin av at hava nøktandi umstøður í sambandi við ferðavinnuna og vitjandi annars. Nevndin ynskir at nýtt alment wc er uppsett áðrenn summar 2010.

Sjúrður Olsen farin av fundi.

Vísandi til skriv frá Sølvá Paturson, j nr 2006-1053/18, staðfestir nevndin, at wc verður tikið burtur áðrenn summar 2010.

- Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 11. februar 2010:** Málið útsett.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 18. januar 2010:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin kunnar um støðuna, eftir at borgarstjórin hevur havt fund við landsstýriskvinnuna mikudagin 3. mars 2010. Umsitingin skal eisini vísa á, at ongin játtan er avsett í fíggjarætlanini til viðskiftahús í Kirkjubø, og at játtan má fáast til vega, áðrenn projektering og bygging verða sett í verk.

**Tekniska nevnd 4. mars 2010:** Málið útsett, tí at fundurin millum borgarstjóran og landsstýriskvinnuna varð útsettur.

**Ískoyti:**
Fundurin við landsstýriskvinnuna hin 3. mars 2010 var avlýstur av landsstýriskvinnuni.

Umsitingin hevur eisini havt samskifti við Føroya Fornminnissavn um málið. Í skrivi móttikið 30. mars 2010 svarar Fornminnissavnið, soleiðis:

Við tað, at tær tænastur, viðskiftahúsið er ætlað til, eru alneyðugar, metir Fornminnissavnið tað verða skilabest at fremja uppskotið, ið fyriliggur. Hetta tó við tí fyrivarni, at talan er um eina fyribils loysn, av tí at nevndu tænastur fara at verða tiknar við í oman fyri nevndu yvirordnaðu økisskipanina. Vert er at gera vart við, at henda økisskipan fer at verða Tá hon fyriliggur, kann henda, at funnin verður onnur loysn á hesum tænastum, ið sampakkar við eina heild. Tá farið verður undir at fremja ætlanina til viðskiftahús eigur kommunan tí at hava hetta í huga.

Við hesi treytaðu tilsøgn ber nú sostatt til at seta eina fyribils loysn í verk. Leysliga mett vil ein detailprojektering kosta uml. kr. 150.000,00.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin vísa til ískoyti til fundin í teknisku nevnd 4. mars 2010, um manglandi fígging, sum nevndin má útvega áðrenn projektering og bygging verða sett í verk, og til treytaðu tilsøgnina frá Fornminnissavninum um eina fyribils loysn.

**Tekniska nevnd 8. apríl 2010:** Nevndin samtykti at heita á fíggjarnevndina at útvega fígging, álj. kr. 150.000,-, til at fremja omanfyri nevndu detailprojektering.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Samtykt at biðja um tilboð uppá detailprojektering við støði í fyriliggjandi uppskoti. Tilboðið verður at leggja fyri fíggjarnevndina á fyrstkomandi fundi.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 26. apríl 2010:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at beina málið í fíggjarnevndina til raðfestingar á langtíðar íløguætlan kommunar.

**Tekniska nevnd 23. september 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum at beina málið í fíggjarnevndina til raðfestingar á langtíðar íløguætlan kommununar.

**Fíggjarnevndin 6. oktober 2010:** Málið útsett til nærri kanningar og at leggja fyri fíggjarnevndin aftur á fyrstkomandi fundi.

**Fíggjarnevndin 17.november 2010:** Tekniski stjóri kunnaði um málið. Málið verður tikið upp í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt fund við leiðsluna á Tekniska skúla, um at fáa í lag eitt samstarv við skúlan um bygging av viðskiftahúsi í Kirkjubø. Skúlin er sera áhugaður í at luttaka í eini slíkari verkætlan, sum skúlin so eisini vil nýta í síni undirvísing fyrra hálvár 2011. Skúlin hevur luttikið í líknandi verkætlanum fyrr – eitt nú í Koltri og á Dímun. Skúlin ynskir tó ikki at standa fyri byggiarbeiðinum, men at okkurt byggivirki stendur fyri hesum, meðan næmingar skúlans luttaka sum arbeiðsmegi í sambandi við byggingina.

Skúlin skal ikki hava løn til næmingarnar fyri sína luttøku, men hevur eitt ynski um, at kommunan kann veita ein stuðul til eitt nú lestrarferð hjá næmingum.

Umsitingin hevur viðgjørt ynskini hjá Tekniska skúla, og sær ikki nakran trupulleika í at arbeiðið verður gjørt eftir tí leisti, sum skúlin mælir til. Umsitingin mælir til, at tilboð verða umbiðin frá byggivirkjum uppá byggibúningararbeiði, og at sama virki eisini stendur fyri sjálvum byggiarbeiðinum, við hjálp frá næmingum á Tekniska skúla, sum eisini ger elementir o.a. bygningslutir.

Verætlanin verður fíggjað av avlopi frá lidnum verkætlanum, har avsettar eru kr. 1,0 mió. til verkætlanina, (sí j. nr. 2010-2717).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til:
at heita á fíggjarnevndina um at taka upp samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av neyðugum undirlendi til viðskiftahúsið
at heimila umsitingini at lata upp í hendi á ráðgeva at gera byggibúningarprosjekt v.m.
at heimila umsitingini at gera avtalu við Tekniska skúla um, at teir prosjektera bygningin sum ein timbur-element bygning og gera neyðugu bygningslutirnar í hesum sambandi
at kommunan rindar fyri tilfar, ið Tekniski skúlin nýtir til verkætlanina
at heimila umsitingini at bjóða byggibúningararbeiðið v.m. út sum undirhondsboð so skjótt avtala er gjørd um undirlendið.

og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina til góðkenningar.

**Tekniska nevnd 2. desember 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta 1,0 mió. kr. til verkætlanina av lokaðum verkætlanum fyri 2010 (j.nr. 2010-2717).

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 13. desember 2010:** Kunnað varð um málið.

Nevndin vísti á manglar so sum handikap-wc, skiftirúm til smábørn o.o. Biðið verður um at síggja endaliga tekning, áðrenn byggingin byrjar.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitignin hevur latið gera dagført myndugleikaprojekt til góðkenningar. Uppskotið tekur støði í áður gjørdum uppskotum við eyðkenni í tí gamla føroyska byggisniðinum.

Greitt verður frá fyriliggjandi upspkoti.

**Tilmæli**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðkenna uppskotið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. februar 2011:** Nevndin samtykti at góðkenna uppskotið.

**Ískoyti:**
Umsitignin hevur latið gera dagført myndugleikaprojekt til góðkenningar. Uppskotið tekur støði í áður gjørdum uppskotum við eyðkenni í tí gamla føroyska byggisniðinum.

Greitt verður frá fyriliggjandi uppskoti.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at góðkenna uppskotið.

**Tekniska nevnd 10. februar 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og góðkenna fyriliggjandi uppskot og játta 1,0 mió. kr. til verkætlanina av lokaðum verkætlanum fyri 2010 (j.nr. 2010-2717).

**Býráðið 24. februar 2011:** Einmælt samtykt.

**Tilmæli:**
Víst verður til tilmælið til 2. desember 2010 tó við teirri broyting at pkt. 5 verður orðað soljóðandi:
at heimila umsitingini at gera avtalu við arbeiðstakara um at standa fyri betong-, timbur- og snikkaraarbeiðinum saman við tekniska skúla og at kommunan sjálv stendur fyri grevstrar- og planeringsarbeiði við hartilhoyrandi grevstri fyri veitingum (kloakk, vatn og el).

**Tekniska nevnd 5. apríl 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 6. apríl 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og gera avtalu við arbeiðstakara um at standa fyri betong-, timbur- og snikkaraarbeiðinum saman við tekniska skúla og at kommunan sjálv stendur fyri grevstrar- og planeringsarbeiði við hartilhoyrandi grevstri fyri veitingum (kloakk, vatn og el).

**Býráðið 14. apríl 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í framhaldi av býráðssamtykt frá 14. apríl 2011 hevur umsitingin gjørt avtalu við ymsar arbeiðstakarar at standa fyri betong-, timbur- og snikkaraarbeiði saman við tekniska skúlanum umframt at kommunan sjálv hevur staðið fyri planeringini. Higartil eru nýttar

ca 0,4 mió. kr. og fyri hetta er grundøkið planerað liðugt og arbeiðið ísv. forskalling er í gerð.

Sambært framskrivaðari fíggjarmeting hjá umsitingini, j, nr. 20060-1053/111, verður samlaði fíggjartørvurin fyri wc-bygningin og bus terminalin í Kirkjubø álj. kr. 1.300.789,-. Játtaðar eru 1 mió. kr. og sostatt skulu játtast uml. 0,3 mió. afturat, um bygningurin kann gerast sum upprunaliga ætlað.

Kunnað verður annars um gongdina í málinum.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at játta írestandi upphædd álj. kr. 300.000,- av kto. 7510, bussleiðin og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 25. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 26. juli 2012:** Einmælt samtykt.

**Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 1. oktober 2012:** Býarverkfrøðingurin kunnaði um málið.

**Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 18. februar 2013:** Kunnað varð um arbeiðið, ið nú verður tikið uppaftur. Arbeiðið skal verða liðugt til summar hálvuna.

**Ískoyti:**
Hvørjar ætlanir eru við økinum rundan um húsið. Fyriliggur nøkur ætlan um steinsetig, planting o.a.

**Kirkjubøar-velbastaðnevndin 13. mai 2013:** Býarverkfrøðingurin kunnaði um arbeiðið, sum verður liðugt ultimo juni eftir ætlan.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er nú liðugt og farstøðin er tikin í nýtslu. Avhendingin fór fram 13. september 2013 og staðfestir vóru smávegis manglar. (j. nr. 2006-1053/129).

Umsitingin kunnar um arbeiðsgongdina.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Samlaði kostnaðurin fyri viðskiftahúsið er sambært byggirokniskapinum upp á 1,5 mió. kr. (j. nr. 2006-1053/130).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at loka málið og annars beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 24. oktober 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.
Helena D. á Neystabø og Marin Katrina Frýdal luttóku ikki í viðgerðini.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Einmælt samtykt.

**210/13** **2013-2533 BH (sí eisini mál nr. 2013-2363)**

**Fundarpening til býráðslimir ísv. evnisdag til bussleiðina 5. november 2013**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2014 eru ymsir spurningar settir til farleiðirnar hjá bussleiðini og um umfangið at kærum í hesum sambandi. Málið um alla bussleiðina er umfatandi og av somu orsøk verður mett tað kundi verið hóskandi at sett ein evnisdag saman við politisku skipanini at umrøtt alt málið viðvíkjanandi bussleiðini.

Sambært kommunustýrisskipan fyri Tórshavnar kommunu § 39, 17. petti kunnu býráðið og føstu nevndirnar taka avgerð um, at kommunustýrislimur kann luttaka á skeiði, kunningarferð, umboðan v.m. bæði innan- og uttanlands. Tá verður samsýning ella endurgjald latið einstøku kommunustýrislimunum eftir reglunum í pkt. 4 í kunngerðini um samsýning.

Ynskir ein nevnd at luttaka í nevnda virksemi, skal umbønin góðkennast av fíggjarnevndini. Er talan um fíggjarnevndina, skal býráðið góðkenna umbønina.

Ynskir býráðslimur at luttaka í nevnda virksemi, skal umbønin góðkennast av avvarðandi nevnd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta fyri at fundarpeningur kann verða veittur til henda evnisdag fyri øllum áhugaðum býráðslimum.

**Tekniska nevnd 24. oktober 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

Helena D. á Neystabø og Marin Katrina Frýdal luttóku ikki í viðgerðini.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og játta, at fundarpeningur verður veittur til evnisdagin fyri øllum áhugaðum býráðslimum av konto 7510 Bussleiðin.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Einmælt samtykt.

**211/13** **2013-2056 EYE**

**Heimildarskipan hjá umsitingini viðv. staðseting av teleskápum í almennum vegaøki**

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Viðvíkjandi loyvum frá veitarum at seta upp skáp til tekniska útgerð.

Veitarar søkja tíðum um at kunna seta upp skáp til tekniska útgerð á kommunalum øki.

Verandi mannagongd ger, at tað kann ganga long tíð frá umsókn kemur til hon er játtað, hóast talan sum meginreglu er um rættuliga einfaldar standard installatiónir.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at heimila umsitingini at geva umsøkjarum loyvi við standard treytum, sum umsitingin setur, og loyvi sambært standard sáttmála, sum liggur í málinum. (2013-2056/3).

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at beina málið í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
FT-Net hevur latið kommununi fimm umsóknir um uppseting av tøkniskápum, hesar eru:

| | | |
|---|---|---|
| J.nr. | 2013-1783 | FT-net: Umsókn um byggiloyvi til tøkniskáp undir Kongavarða, matr. nr. 255a, Argir |
| J.nr. | 2013-1782 | FT-net: Umsókn um byggiloyvi til tøkniskáp á matr. nr. 1145a, Tórshavn |
| J.nr. | 2013-1781 | FT-net: Umsókn um byggiloyvi til tøkniskáp á matr. nr. 140a, Hoyvík |
| J.nr. | 2013-1779 | FT-net: Umsókn um byggloyvi til tøkniskáp á matr. nr. 21b, Kirkjubø |
| J.nr. | 2013-1778 | FT-net: Umsókn um byggiloyvi til tøkniskáp á matr. nr. 4cn, Argir(Hamarin) |

Umsitingin leggur fram uppskot til meginreglur í sambandi við standardloyvi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við tilmælinum hjá leiðaranum á løgdeildini og kommunustjóranum til fíggjarnevndina tann 13. september 2013 og vilja samstundis leggja dent á at tað í standardtreytunum verður tryggja, at kommunan kann krevja skáp, leiðingar og útgerð í hesum sambandinum burtur aftur fyri eigarans rokning, um hon stendur í vegin fyri framtíðar broytingum á viðkomandi økjum.

**Tekniska nevnd 9. oktober 2013:** Útsett.

**Tekniska nevnd 24. oktober 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2013:** Umrøtt og útsett til nærri útgreining av spurninginum um, hvørt kommunan skal krevja gjald fyri nýtsluna av kommunalum øki.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Tikið av skrá.

**212/13** **<u>2013-1599/4 SG</u>**

**<u>Tórshavnar ungdómsráð</u>**

**Lýsing og samandráttur av málinum:**
Leingi hevur verið tosað um týdningin av at seta á stovn eitt ungdómsráð í Tórshavnar kommunu.

Eitt ungdómsráð er umboð teirra ungu í kommununi. Endamálið er at styrkja demokratiið í kommununi, við at skapa eitt forum, har ung, sum í dag ikki hava valrætt til býráðið ella løgtingið, fáa eina rødd í politisku skipanini.

Arbeitt verður við einum uppskoti til viðtøkur fyri Tórshavnar ungdómsráð.

**Tilmæli:**
Borgarstjórin mælir til í prinsippinum at taka undir við uppskotinum at skipa Tórshavnar ungdómsráð og beina málið í mentamálanevndina.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt og beint í mentamálanevndina.

**Ískoyti:**

Uppskot til viðtøkur fyri Tórshavnar ungdómsráð verður lagt fram. Viðtøkurnar fevna um endamál, heimildir og starvshátt ráðsins, um skipan av vali til ungdómsráð, um nevndarskipan v.m.

Skipanin og uppgávurnar hjá ungdómsráðnum er at sammeta við eldraráðið. Tó er tann munur, at valskeiðið ætlast styttri, nevniliga 2 ár, og at valaldurin ætlast lægri enn til vanlig politisk val (býráðs- og løgtingsval v.m.).

Ungdómsráðnum ætlast eitt tilhaldsstað og fígging. Eldraráðið hevur kr. 200.000 til sítt virksemið á kontu 1315 Nevndir og ráð. Mett verður, at henda konta eigur at verða hækkað til kr. 400.000, so bæði ráðini hava kr. 200.000 um árið til virksemið, fyriskipan av vali v.m.

Støða skal takast til, hvussu fyrsta valið til ungdómsráðið skal fyriskipast. Í hesum sambandi er uppskot at seta ein bólk av ungdómum, sum næmingafeløg á miðnámsskúlum og Nám X tilnevna, við tí endamáli saman við kommununi at fyriskipa valið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at samtykkja uppskot til viðtøkur fyri Tórshavnar ungdómsráð.

**Mentamálanevndin 9. oktober 2013:** Nevndin mælir til at samtykkja viðtøkurnar við teirri broyting í § 6, at valbæri og atkvøðurætt hava øll ung í kommununi, ið á valdegnum eru millum 14-22 ára gomul. Nevndin samtykti eisini at heita á umsitingina um at vísa á fígging og innivist til ráðið.

**Ískoyti:**
Mett verður rættast, at viðtøkurnar verða samtyktar í fíggjarnevndini og býráðnum eins og gjørt varð, tá eldraráðið varð stovnað. Í fíggjarætlanaruppskotinum fyri 2014 er lagt upp fyri játtan til ungdómsráðið kr. 100.000.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna viðtøkurnar fyri Tórshavnar ungdómsráð.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Einmælt samtykt.

**FUNDUR LOKIN KL. 20:55**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Elin Lindenskov | Bjørghild Djurhuus |
| Helena Dam á Neystabø | Sigrún Mohr | Tróndur Sigurdsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andresen | Annfinn Brekkstein |
| Sjúrður Olsen | Jákup Dam | Marin Katrina Frýdal |
| | Heðin Mortensen | |